| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**4. mars 2014** | Blað nr.: **1** |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato: 4. mars 2014** **Kl. 17:00**
**Stað: Býráðssalurin**
**Málsnr: 25/14-45/14**

**FUNDARLEIÐARI:**

Heðin Mortensen

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Elin Lindenskov
Sjúrður Johan Olsen
Sigrún Mohr

**LUTTÓKU EISINI:**
Ingunn Eiriksdóttir
Jóan Petur Hentze
Eyðna Justinussen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

## 30/14 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2014

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 19.02.2014 | 8/14 | 14/01236-1 |
| 2 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 30/14 | 14/01236-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 19. februar 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 04. mars 2014:** Framlagt og góðkent.

# 31/14 Fíggjarætlan 2014

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 19.02.2014 | 26/14 | 14/01192-26 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.02.2014 | 45/14 | 14/01192-26 |
| 3 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 31/14 | 14/01192-26 |

**Fíggjarætlan 2014**

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Uppskot til fíggjarætlan 2014 á greinastøði varð lagt fram. Samtykt at arbeiða víðari við uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2014 við teirri broyting, at eingin vøkstur verður í rakstrarútreiðslunum.

Jógvan Arge luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Ískoyti:**
Stjórnin hevur arbeitt víðari við uppskotinum til fíggjarætlan 2014.

Uppskotið verður lagt fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 23. september 2013:** Framlagt og samtykt at leggja fyri býráðið.

**Býráðið 26. september 2013:** Framlagt.

**Yvirlit**

**Høvuðsyvirlit**

| **Høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlan** | | | **2014** |
|---|---|---|---|
| | Rakstrarætlan | | Løgu- |
| Túsund kr. | Útreiðslur | Inntøkur | ætlan |
| **§ 1. Kommunal fyrisiting** | **69.721** | **-** | **-** |
| 11. Felagsútreiðslur | 66.658 | - | - |
| 18. Almenn starvsfólk v.m. | 3.063 | - | - |
| **§ 2. Almanna- og heilsumál** | **54.127** | **-** | **1.000** |
| 20. Heilsumál | 16.005 | - | - |
| 21. Almannamál | 38.122 | - | 1.000 |
| **§ 3. Børn og ung** | **134.902** | **-** | **5.000** |
| 24. Mentan | 6.844 | - | - |
| 26. Barnaansing | 128.058 | - | 5.000 |
| **§ 4. Undirvísing** | **36.701** | **-** | **-** |
| 23. Útbúgving og gransking | 36.701 | - | - |
| **§ 5. Mentan og frítíð** | **41.325** | **-** | **43.000** |
| 23. Útbúgving og gransking | 10.532 | - | 3.000 |
| 24. Mentan | 30.793 | - | 40.000 |
| **§ 6. Teknisk mál** | **110.487** | **-** | **42.000** |
| 11. Felagsútreiðslur | 49.310 | - | 25.000 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 22. Íbúðarmál | - | - | 2.000 |
| 24. Mentan | 2.798 | - | 1.000 |
| 30. Umhvørvi | 17.913 | - | 4.000 |
| 38. Samferðsla og samskifti | 40.466 | - | 10.000 |
| **§ 7. Kommunal virki** | **32.820** | **-** | **40.598** |
| 30. Umhvørvi | 18.497 | - | 19.000 |
| 31. Tilbúgving | 8.171 | - | - |
| 37. Handil og vinna annars | 3.720 | - | - |
| 38. Samferðsla og samskifti | 2.432 | - | 21.598 |
| **Tilsamans** | **480.083** | **-** | **131.598** |
| § 20. 22. Íbúðarmál | 25.000 | - | - |
| § 20. 50. Rentur | 10.332 | 300 | - |
| § 20. 52. Skattir og avgjøld | 2.250 | 648.963 | - |
| Tilsamans | 517.665 | 649.263 | 131.598 |
| **Yvirskot** | **-** | **131.598** | **-** |

| | Útreiðslur | Inntøkur | Yvirskot |
|---|---|---|---|
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | **-** | **0** | **-** |
| § 25. 62. Afturgjald av skuld | 17.739 | - | **-** |
| **Bruttokassaúrslit** | **17.739** | **0** | **-17.739** |
| Fígging: | | | |
| § 25. 64. Útvegan av gjaldføri | - | 17.739 | **-** |
| Fígging íalt: | - | 17.739 | 17.739 |
| **Samanlagt** | **17.739** | **17.739** | **-** |

## Tekstur

### § 1 Kommunal fyrisiting

### A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 69.721 | 69.721 | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **66.658** | **-** |
| 1.11.11. Samsýningar o.a. til kommunustýrislimir | | 3.488 | - |
| 1.11.12. Val og valnevndir | | 50 | - |
| 1.11.14. Kommunufyrisitingin | | 61.929 | - |
| 1.11.21. Kommunufeløg | | 1.191 | - |
| **Almenn starvsfólk v.m.** | | **3.063** | **-** |
| 1.18.11. Tænastumannaeftirlønir | | 3.063 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 69.721 | - |
| Nettostýrt virksemi | 4.311 | 4.311 |
| Virksemi tilsamans | 74.032 | 4.311 |
| Rakstrarinntøkur | - | 2.211 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 751 | 2.000 |
| Flytingarútreiðslur | 4.238 | - |
| Rakstrarútreiðslur | 69.043 | - |
| Skattir og flytingarinntøkur | - | 100 |

**B. Játtanir**

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| | - Tús. kr. - | |
| **Felagsútreiðslur** | | |
| **1.11.11. Samsýningar o.a. til kommunustýrislimir** | | |
| 110. Samsýningar o.a. til kommunustýrislimir (Rakstrarj.) | 3.488 | - |
| **1.11.12. Val og valnevndir** | | |
| 110. Val og valnevndir (Rakstrarj.) | 50 | - |
| **1.11.14. Kommunufyrisitingin** | | |
| 110. Kommunufyrisitingin (Rakstrarj.) | 61.929 | - |
| **1.11.21. Kommunufeløg** | | |
| 110. Kommunufeløg (Stuðulsj.) | 1.191 | - |
| **Almenn starvsfólk v.m.** | | |
| **1.18.11. Tænastumannaeftirlønir** | | |
| 110. Eftirlønir (Stuðulsj.) | 3.063 | - |

**§ 2 Almanna- og heilsumál**

**A. Yvirlit**

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 54.127 | 54.127 | - |
| Løguætlan | 1.000 | 1.000 | - |
| **Heilsumál** | | **16.005** | **-** |
| 2.20.21. Ymiskar heilsuútreiðslur | | 1.700 | - |
| 2.20.22. Kommunulækna- og heilsutænastur | | 4.000 | - |

| | | |
|---|---|---|
| 2.20.23. Tannrøkt | 10.305 | - |
| **Almannamál** | **39.122** | **-** |
| 2.21.12. Stuðul til endamál innan almanna- og heilsumál | 100 | - |
| 2.21.13. Ymiskar almannaútreiðslur | 1.204 | - |
| 2.21.31. Barnavernd | 26.284 | - |
| 2.21.61. Eldrarøkt | 3.313 | - |
| 2.21.62. Tilboð og tiltøk til eldri | 3.221 | - |
| 2.21.72. Forsorg | 5.000 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 55.127 | - |
| Nettostýrt virksemi | 76.857 | 76.857 |
| Virksemi tilsamans | 131.984 | 76.857 |
| Rakstrarinntøkur | - | 1.438 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 6.344 | 75.419 |
| Flytingarútreiðslur | 6.684 | - |
| Rakstrarútreiðslur | 117.956 | - |
| Løguútreiðslur | 1.000 | - |

## B. Játtanir

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| | - Tús. kr. - | |

### Heilsumál

**2.20.21. Ymiskar heilsuútreiðslur**

| | | |
|---|---|---|
| 110. Ymiskar heilsuútreiðslur (Rakstrarj.) | 1.700 | - |

**2.20.22. Kommunulækna- og heilsutænastur**

| | | |
|---|---|---|
| 110. Kommunulækna- og heilsutænastur (Rakstrarj.) | 4.000 | - |

**2.20.23. Tannrøkt**

| | | |
|---|---|---|
| 110. Tannrøkt (Rakstrarj.) | 10.305 | - |

### Almannamál

**2.21.12. Stuðul til endamál innan almanna- og heilsumál**

| | | |
|---|---|---|
| 110. Stuðul til endamál innan almanna- og heilsumál (Stuðulsj.) | 100 | - |

**2.21.13. Ymiskar almannaútreiðslur**

| | | |
|---|---|---|
| 110. Ymiskar almannaútreiðslur (Rakstrarj.) | 1.204 | - |

**2.21.31. Barnavernd**

| | | |
|---|---|---|
| 110. Barnavernd (Rakstrarj.) | 26.284 | - |

**2.21.61. Eldrarøkt**

| | | |
|---|---|---|
| 111. Eldrarøkt (Løguj.) | 1.000 | - |
| 110. Eldrarøkt (Rakstrarj.) | 2.313 | - |

**2.21.62. Tilboð og tiltøk til eldri**

| | | |
|---|---|---|
| 110. Tilboð og tiltøk til eldri (Rakstrarj.) | 3.221 | - |

**2.21.72. Forsorg**

| | | |
|---|---|---|
| 110. Forsorg (Stuðulsj.) | 5.000 | - |

## § 3 Børn og ung

### A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 134.902 | 134.902 | - |
| Løguætlan | 5.000 | 5.000 | - |
| **Mentan** | | **6.844** | **-** |
| 3.24.12. Tilboð og tiltøk til børn og ungdóm | | 6.844 | - |
| **Barnaansing** | | **133.058** | **-** |
| 3.26.11. Barnaansing | | 133.058 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 139.902 | - |
| Nettostýrt virksemi | 34.251 | 34.251 |
| Virksemi tilsamans | 174.153 | 34.251 |
| Rakstrarinntøkur | - | 34.251 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 9.262 | - |
| Flytingarútreiðslur | 12.112 | - |
| Rakstrarútreiðslur | 147.779 | - |
| Løguútreiðslur | 5.000 | - |

### B. Játtanir

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| | - Tús. kr. - | |

**Mentan**

**3.24.12. Tilboð og tiltøk til børn og ungdóm**

| | | |
|---|---|---|
| 110. Tilboð og tiltøk til børn og ung (Rakstrarj.) | 6.844 | - |

**Barnaansing**

**3.26.11. Barnaansing**

| | | |
|---|---|---|
| 110. Barnaansing (Rakstrarj.) | 111.187 | - |
| 111. Barnaansing (Løguj.) | 5.000 | - |
| 112. Aðrar útreiðslur í samband við barnaansing (Rakstrarj.) | 16.871 | - |

## § 4 Undirvísing

### A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 36.701 | 36.701 | - |
| **Útbúgving og gransking** | | **36.701** | **-** |
| 4.23.22. Fólkaskúlin | | 35.776 | - |
| 4.23.31. Endurgjald til lærlingaútreiðslur | | 925 | - |
| *Yvirlit yvir høvuðssløg:* | | | |
| Játtan tilsamans | | 36.701 | - |
| Nettostýrt virksemi | | - | - |
| Virksemi tilsamans | | 36.701 | - |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | | 3.927 | - |
| Flytingarútreiðslur | | 1.020 | - |
| Rakstrarútreiðslur | | 31.754 | - |

### B. Játtanir

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| | - Tús. kr. - | |
| **Útbúgving og gransking** | | |
| **4.23.22. Fólkaskúlin** | | |
| 112. Verkætlanir og aðrar útreiðslur á fólkaskúlaøkinum (Rakstrarj.) | 1.962 | - |
| 110. Fólkaskúlin (Rakstrarj.) | 33.814 | - |
| **4.23.31. Endurgjald til lærlingaútreiðslur** | | |
| 110. Endurgjald til lærlingaútreiðslur (Stuðulsj.) | 925 | - |

## § 5 Mentan og frítíð

### A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 41.325 | 41.325 | - |
| Løguætlan | 43.000 | 43.000 | - |
| **Útbúgving og gransking** | | **13.532** | **-** |
| 5.23.51. Musikkskúlin | | 9.631 | - |
| 5.23.52. Kvøld- og listaskúlar | | 3.901 | - |
| **Mentan** | | **70.793** | **-** |
| 5.24.13. Tilboð og tiltøk innan mentan og frítið | | 4.935 | - |
| 5.24.14. Stuðul til ítróttar- og mentanarendamál | | 6.166 | - |
| 5.24.31. Bókasavn | | 6.116 | - |
| 5.24.32. Søvn og mentanararvur | | 755 | - |
| 5.24.61. Svimjihøllin | | 6.627 | - |
| 5.24.62. Ítróttaranlegg | | 46.194 | - |
| *Yvirlit yvir høvuðssløg:* | | | |
| Játtan tilsamans | | 84.325 | - |
| Nettostýrt virksemi | | 12.491 | 12.491 |
| Virksemi tilsamans | | 96.816 | 12.491 |
| Rakstrarinntøkur | | - | 8.821 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | | 5.313 | 3.590 |
| Flytingarútreiðslur | | 6.166 | - |
| Rakstrarútreiðslur | | 42.337 | - |
| Skattir og flytingarinntøkur | | - | 80 |
| Løguútreiðslur | | 43.000 | - |

## B. Játtanir

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| | - Tús. kr. - | |
| **Útbúgving og gransking** | | |
| **5.23.51. Musikkskúlin** | | |
| 110. Musikkskúlin (Rakstrarj.) | 6.631 | - |
| 111. Musikkskúlin (Løguj.) | 3.000 | - |
| **5.23.52. Kvøld- og listaskúlar** | | |
| 110. Kvøld- og listaskúlar (Rakstrarj.) | 3.901 | - |
| **Mentan** | | |
| **5.24.13. Tilboð og tiltøk innan mentan og frítið** | | |
| 111. Tilboð og tiltøk innan mentan og frítíð (Løguj.) | 2.000 | - |
| 110. Tilboð og tiltøk innan mentan og frítíð (Rakstrarj.) | 2.935 | - |
| **5.24.14. Stuðul til ítróttar- og mentanarendamál** | | |
| 111. Stuðul til íløgur (Stuðulsj.) | 506 | - |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | 110. Stuðul til ítróttar- og mentanarendamál (Stuðulsj.) | 5.660 | - |
| **5.24.31.** | **Bókasavn** | | |
| | 110. Bókasavn (Rakstrarj.) | 6.116 | - |
| **5.24.32.** | **Søvn og mentanararvur** | | |
| | 110. Søvn og mentanararvur (Rakstrarj.) | 755 | - |
| **5.24.61.** | **Svimjihøllin** | | |
| | 110. Svimjihøllin (Rakstrarj.) | 6.627 | - |
| **5.24.62.** | **Ítróttaranlegg** | | |
| | 110. Ítróttaranlegg (Rakstrarj.) | 8.194 | - |
| | 111. Ítróttaranlegg (Løguj.) | 38.000 | - |

## § 6 Teknisk mál

### A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 110.487 | 110.487 | - |
| Løguætlan | 42.000 | 42.000 | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **74.310** | **-** |
| 6.11.31. Umsiting og røkt av fastognum | | 49.362 | - |
| 6.11.32. Fríðkan av kommununi | | 24.948 | - |
| **Íbúðarmál** | | **2.000** | **-** |
| 6.22.11. Byggibúning bústaðir | | 2.000 | - |
| **Mentan** | | **3.798** | **-** |
| 6.24.51. Kirkjugarður | | 3.798 | - |
| **Umhvørvi** | | **21.913** | **-** |
| 6.30.11. Umhvørvistiltøk v.m. | | 2.278 | - |
| 6.30.21. Vatnveiting | | 6.398 | - |
| 6.30.41. Kloakkir | | 13.237 | - |
| **Samferðsla og samskifti** | | **50.466** | **-** |
| 6.38.11. Vegir | | 34.594 | - |
| 6.38.12. Gøtuljós | | 7.334 | - |
| 6.38.13. Rakstrargøgn | | 8.538 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 152.487 | - |
| Nettostýrt virksemi | 15.756 | 15.756 |
| Virksemi tilsamans | 168.243 | 15.756 |
| Rakstrarinntøkur | - | 15.756 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 4.396 | - |
| Flytingarútreiðslur | 600 | - |

| | | |
|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 121.247 | - |
| Løguútreiðslur | 42.000 | - |

**B. Játtanir**

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| | - Tús. kr. - | |
| **Felagsútreiðslur** | | |
| **6.11.31. Umsiting og røkt av fastognum** | | |
| 110. Umsiting og røkt av fastognum (Rakstrarj.) | 39.362 | - |
| 111. Umsiting og røkt av fastognum (Løguj.) | 10.000 | - |
| **6.11.32. Fríðkan av kommununi** | | |
| 111. Fríðkan av kommununi (Løguj.) | 15.000 | - |
| 110. Fríðkan av kommununi (Rakstrarj.) | 9.948 | - |
| **Íbúðarmál** | | |
| **6.22.11. Byggibúning bústaðir** | | |
| 111. Byggibúning bústaðir (Løguj.) | 2.000 | - |
| **Mentan** | | |
| **6.24.51. Kirkjugarður** | | |
| 111. Kirkjugarðar (Løguj.) | 1.000 | - |
| 110. Kirkjugarðar (Rakstrarj.) | 2.798 | - |
| **Umhvørvi** | | |
| **6.30.11. Umhvørvistiltøk v.m.** | | |
| 110. Umhvørvistiltøk v.m. (Rakstrarj.) | 2.278 | - |
| **6.30.21. Vatnveiting** | | |
| 110. Vatnveiting (Rakstrarj.) | 6.398 | - |
| **6.30.41. Kloakkir** | | |
| 111. Kloakkir (Løguj.) | 4.000 | - |
| 110. Kloakkir (Rakstrarj.) | 9.237 | - |
| **Samferðsla og samskifti** | | |
| **6.38.11. Vegir** | | |
| 110. Vegir (Rakstrarj.) | 28.594 | - |
| 111. Vegir (Løguj.) | 6.000 | - |
| **6.38.12. Gøtuljós** | | |
| 110. Gøtuljós (Rakstrarj.) | 7.334 | - |
| **6.38.13. Rakstrargøgn** | | |
| 110. Rakstrargøgn (Rakstrarj.) | 4.538 | - |
| 111. Rakstrargøgn (Løguj.) | 4.000 | - |

## § 7 Kommunal virki

### A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---:|---:|---:|
| Útreiðsluætlan | 32.820 | 32.820 | - |
| Løguætlan | 40.598 | 40.598 | - |
| **Umhvørvi** | | **37.497** | **-** |
| 7.30.42. Renovasjón | | 37.497 | - |
| **Tilbúgving** | | **8.171** | **-** |
| 7.31.11. Sløkkiliðið | | 8.171 | - |
| **Handil og vinna annars** | | **3.720** | **-** |
| 7.37.51. Vinnumenning | | 3.720 | - |
| **Samferðsla og samskifti** | | **24.030** | **-** |
| 7.38.14. Havnir og lendingar | | 0 | - |
| 7.38.21. Bussleiðin | | 24.030 | - |
| 7.38.22. Parkeringsskipanin | | 0 | - |
| *Yvirlit yvir høvuðssløg:* | | | |
| Játtan tilsamans | | 73.418 | - |
| Nettostýrt virksemi | | 77.752 | 77.752 |
| Virksemi tilsamans | | 151.170 | 77.752 |
| Rakstrarinntøkur | | - | 70.565 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | | 3.015 | 5.000 |
| Flytingarútreiðslur | | 5.900 | - |
| Rakstrarútreiðslur | | 101.657 | - |
| Skattir og flytingarinntøkur | | - | 2.187 |
| Løguútreiðslur | | 40.598 | - |

### B. Játtanir

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---:|---:|
| | - Tús. kr. - | |
| **Umhvørvi** | | |
| **7.30.42. Renovasjón** | | |
| 110. Renovasjón (Rakstrarj.) | 18.497 | - |
| 111. Renovasjón (Løguj.) | 19.000 | - |
| **Tilbúgving** | | |
| **7.31.11. Sløkkiliðið** | | |

| | | |
|---|---|---|
| 110. Sløkkiliðið (Rakstrarj.) | 8.171 | - |

**Handil og vinna annars**

| | | |
|---|---|---|
| **7.37.51. Vinnumenning** | | |
| 110. Vinnumenning (Rakstrarj.) | 3.720 | - |

**Samferðsla og samskifti**

| | | |
|---|---|---|
| **7.38.14. Havnir og lendingar** | | |
| 111. Havnir og lendingar (Løguj.) | 21.598 | - |
| 110. Havnir og lendingar (Rakstrarj.) | -21.598 | - |
| **7.38.21. Bussleiðin** | | |
| 110. Bussleiðin (Rakstrarj.) | 24.030 | - |
| **7.38.22. Parkeringsskipanin** | | |
| 110. Parkeringsskipanin (Rakstrarj.) | 0 | - |

## § 20 Inntøkur

### A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -611.681 | 37.582 | 649.263 |
| **Íbúðarmál** | | **25.000** | **-** |
| 20.22.41. Stuðul til rentuútreiðslur | | 25.000 | - |
| **Rentur** | | **10.332** | **300** |
| 20.50.11. Rentuútreiðslur | | 10.332 | - |
| 20.50.21. Rentuinntøkur | | - | 300 |
| **Skattir og avgjøld** | | **2.250** | **648.963** |
| 20.52.11. Kommunuskattur | | - | 620.963 |
| 20.52.12. Felagsskattur | | - | 18.000 |
| 20.52.13. Skattur av eftirløn | | - | 10.000 |
| 20.52.39. Aðrar inntøkur | | 2.250 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 37.582 | 649.263 |
| Nettostýrt virksemi | - | - |
| Virksemi tilsamans | 37.582 | 649.263 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 25.000 | - |
| Flytingarútreiðslur | 10.332 | - |
| Rakstrarútreiðslur | 2.250 | - |
| Skattir og flytingarinntøkur | - | 649.263 |

## B. Játtanir

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| | - Tús. kr. - | |
| **Íbúðarmál** | | |
| **20.22.41. Stuðul til rentuútreiðslur** | | |
| 110. Stuðul til rentuútreiðslur (Stuðulsj.) | 25.000 | - |
| **Rentur** | | |
| **20.50.11. Rentuútreiðslur** | | |
| 110. Rentuútreiðslur (Ógreinað j.) | 10.332 | - |
| **20.50.21. Rentuinntøkur** | | |
| 110. Rentuinntøkur (Ógreinað j.) | - | 300 |
| **Skattir og avgjøld** | | |
| **20.52.11. Kommunuskattur** | | |
| 110. Kommunuskattur (Ógreinað j.) | - | 620.963 |
| **20.52.12. Felagsskattur** | | |
| 110. Felagsskattur (Ógreinað j.) | - | 18.000 |
| **20.52.13. Skattur av eftirløn** | | |
| 110. Skattur av eftirløn (Ógreinað j.) | - | 10.000 |
| **20.52.39. Aðrar inntøkur** | | |
| 110. Aðrar inntøkur (Ógreinað j.) | 2.250 | - |

## § 25 Gjaldføri

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 0 | 17.739 | 17.739 |
| **Afturgjald av skuld** | | **17.739** | **-** |
| 25.62.11. Afturgjald av skuld | | 17.739 | - |
| **Útvegan av gjaldføri** | | **-** | **17.739** |
| 25.64.11. Útvegan av gjaldføri | | - | 17.739 |
| *Yvirlit yvir høvuðssløg:* | | | |
| Játtan tilsamans | | 17.739 | 17.739 |
| Nettostýrt virksemi | | - | - |
| Virksemi tilsamans | | 17.739 | 17.739 |
| Fíggjarpostar | | 17.739 | 17.739 |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| | **Afturgjald av skuld** | | |
| **25.62.11.** | **Afturgjald av skuld** | | |
| 110. | Afturgjald av skuld (Ógreinað j.) | 17.739 | - |
| | **Útvegan av gjaldføri** | | |
| **25.64.11.** | **Útvegan av gjaldføri** | | |
| 110. | Útvegan av gjaldføri (Ógreinað j.) | - | 17.739 |

### Íløguætlan

| | | 2011 | 2012 | 2013 | **2014** |
|---|---|---|---|---|---|
| | | J | J | J | **F** |
| **§2** | **Almanna- og heilsumál** | **22.750** | **42.000** | **0** | **1.000** |
| 2275 | Læknahølir | | 2.500 | | |
| 2375 | Tannlæknamiðstøð | | 1.000 | | |
| 2575 | Kommunalar íbúðir | | 1.000 | | |
| 2775 | Boðanesheimið | 22.000 | 36.500 | | |
| 2775 | Ellisheimið | 750 | 1.000 | | |
| 2775 | Eldrarøkt | | | | 1.000 |
| **§3** | **Børn og ung** | | | **3.000** | **5.000** |
| 3175 | Birkilund | | | 3.000 | |
| 3175 | Dagstovnur í Kollafirði | | | | 5.000 |
| **§4** | **Undirvísing** | **54.900** | **12.500** | **6.000** | **0** |
| 4175 | Dagføring av skúlum | 11.000 | 12.500 | | |
| 4175 | Skúlin í Kollafirði | 3.000 | | | |
| 4175 | Eysturskúlin lon E | | | 2.000 | |
| 4175 | Hoyvíkar skúli | | | 2.000 | |
| 4176 | Skúlin við Løgmannabreyt | | | | |
| 4176 | Skúlin á Hamrinum | 32.000 | | | |
| 4176 | Sanka Frans smábarnaskúli | 8.900 | | | |
| 4176 | Vesturskúli | | | 2.000 | |
| **§5** | **Mentan og frítíð** | **11.538** | **37.300** | **32.591** | **43.000** |
| 5175 | Musikkskúli | 4.000 | 8.000 | 1.300 | 3.000 |
| 5375 | Reinsaríið | 1.500 | 1.000 | 3.000 | 2.000 |
| 5375 | Skálatrøð framtíðarætlan | | 3.000 | | |
| 5375 | Müllers pakkhús | | 1.000 | | |
| 5375 | Boðanesgjógv mentanarøki | | 1.000 | | |
| 5475 | Býarbókasavnið  kjallarin | | 1.500 | | |
| 5775 | Høllin á Hálsi | | 2.500 | 10.000 | 4.000 |
| 5775 | Høllin í Kollafirði | 1.500 | 2.300 | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 5775 | Høllin í Hoyvík | | | 2.291 | 2.000 |
| 5775 | Ítróttarhøll inni í Vika á Argjum | | | | 1.000 |
| 5775 | Ítróttarhøll við Landavegin | | | | 9.000 |
| 5775 | Tórsvøllur | 4.538 | 4.000 | 10.000 | 12.000 |
| 5775 | Svimjihøll | | 5.000 | 5.000 | |
| 5775 | Baðiland | | | | 1.000 |
| 5775 | Oyggjaleikir/Golfvøllur | | 5.000 | | 3.000 |
| 5775 | Vøllur í Hoyvík | | 2.000 | 1.000 | 6.000 |
| 5775 | Høli til frælsan ítrótt | | 1.000 | | |

| | | **2011**<br>J | **2012**<br>J | **2013**<br>J | **2014**<br>**F** |
|---|---|---|---|---|---|
| **§6** | **Teknisk mál** | **13.600** | **40.000** | **46.700** | **42.000** |
| 6175 | Keyp av bygningum | | | | 10.000 |
| 6275 | Fríðkan av býnum | 1.000 | 2.000 | | 2.000 |
| 6275 | Frílendisætlan Boðanes/Hoydalar | | | | 1.000 |
| 6275 | Lendisgøtur | | | | 1.000 |
| 6275 | Miðbýarætlan | | | 2.000 | 9.000 |
| 6275 | Miðbýarumhvørvi | | 1.000 | | |
| 6275 | Spælipláss í miðbýnum | | | | 2.000 |
| 6275 | Havnará | 1.000 | | | |
| 6475 | Byggibúning bústaðir / í Kollafirði | | | | 1.000 |
| 6475 | Byggibúning bústaðir / Djúpagil | | | | 1.000 |
| 6575 | Kirkjugarðar | 1.000 | 1.000 | 3.000 | 1.000 |
| 6575 | Kirkjugarður í Hoyvík | | 1.000 | | |
| 6775 | Vatnveiting | | 1.000 | | |
| 6875 | Kloakkir | 4.000 | 7.000 | 5.700 | 4.000 |
| 8175 | Aðrar vegaverkætlanir | | | | 1.000 |
| 8175 | Glyvursvegur við brúgv | 2.600 | 10.000 | 25.000 | |
| 8175 | Gongugøtan | | 2.000 | | 1.000 |
| 8175 | Gøta til Hvítanes | | 1.500 | | |
| 8175 | Súkklubreyt | | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| 8175 | Glyvursvegur slitlag | | 1.000 | | |
| 8175 | Rundkoyring við Óluvugøtu | | 2.000 | | |
| 8175 | Vegakervið Dvørgast./undir Borgarah. | | 2.000 | | |
| 8175 | Dvørgastígur | | | 1.000 | 2.000 |
| 8175 | Eystari ringv./Hvítanesv-ljósregulering | | 1.500 | | |
| 8175 | Sundsvegur dagføring | | 2.000 | 6.000 | |
| 8275 | Gøtuljós- Orkusparing og stýringar | | | | 1.000 |
| 8375 | Rakstrargøgn | 4.000 | 4.000 | 3.000 | 4.000 |
| **§7** | **Kommunal virki** | **6.000** | **4.000** | **10.000** | **19.000** |
| 7175 | Renovatión | 4.000 | 2.000 | 10.000 | 19.000 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 7476 | Smábátahavn | 2.000 | 2.000 | | |
| | | **108.788** | **135.800** | **98.291** | **110.000** |
| | | | | | |
| 7475 | Tórshavnar havn | 22.700 | 21.169 | 21.784 | 21.598 |
| | **Samanlagt** | **131.488** | **156.969** | **120.075** | **131.598** |

**Ískoyti:**
Í framlagda uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2014, eru stórar broytingar av nøkrum játtanum til rakstur á tekniska økinum, §6 og §7.

Størstu broytingarnar eru hesar:

| Konto | Rakstrarstað | Viðmerking |
|---|---|---|
| 6109 | Húsaumsitingin | Lækkar við kr. 1.769 mió. Sparing fyri 2014 einans, av tí at tað vegna ávísar umstøður verður avlop frá 2013 at flyta fram til 2014. |
| 6110 | Húsaumsitingin | Lækkar við kr. 3.347 mió. Sparing fyri 2014 einans, av tí at tað vegna ávísar umstøður verður avlop frá 2013 at flyta fram til 2014. |
| 7110 | Renovatión | Hækkar við kr. 500.000. Orsakað av sáttmálaásettari prístalsregulering og regulering fyri tal av ruskposum |
| 7510 | Bussleiðin | Hækkar við kr. 1.500.000. Orsakað av sáttmálaásettari prístalsregulering. |
| | | |

**Tekniska nevnd 9. oktober 2013:** Umrøtt og samtykt at áseta nýggjan fund mánadagin 14. oktober 2013, kl. 16.00.

**Mentamálanevndin 9. oktober 2013:** Umrøtt og áseta nýggjan fund.

**Tilbúgvingarnevndin 10. oktober 2013:** Samtykt at taka undir við framlagda uppskoti til fíggjarætlan 2014.

**Ískoyti:**
Í sambandi við viðgerðina av fíggjarætlanini á fundinum 9. okt. 2013, vóru hesi viðurskifti reist, sum hædd ikki er tikin fyri í fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan fyri 2014:

1. Kto 8210 Gøtuljós: Hædd er ikki tikin fyri, at el-orkuprísirnir eru munandi hækkaðir seinastu árini, eins og umfangið av el-útreiðslum í sambandi við hátíðarhald, so sum ólavsøku, jólabý o.l. somuleiðis er munandi hækkað. Kommunan hevur ikki møguleika at stýra el-prísinum, og tá hesin partur er so stórur partur av konto 8210, má játtanin til hetta hækkast við kr. 300 tús.
2. Kto 8111 Reinhald: Virksemið innan hesa konto er økt í 2013, tá wc í Steinatúni kom undir somu upplatingaskipan sum wc í Mylnugøtu. Í uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2014 er ikki tikin hædd fyri hesum nýggja rakstrarstaðnum. Hetta er einasta almenna wc í miðbýnum, har rørslutarnað hava nøktandi atkomumøguleikar. Rakstrarkostnaðurin fyri hetta rakstrarstaðið er kr. 400 tús. árliga, til lønir, el, reingerð o.l.
3. Kto 8111 Reinhald: Eitt alment wc var fyri fáum árum síðani latið upp í Kollafirði nærhendis innkoyringina til kirkjuna. Talan var um eina fyribils loysn, sum ikki kann metast at verða nøktandi uppá sikt. Ynski hevur verið frammi um, at gera eina endaliga loysn fyri eitt alment wc á hesum stað, nú Landsverk er í holt við at broyta innkoyringina, sum liður í eini

ferðslutryggjan av íbindingini í landsvegin. Talan er um eitt nýtt wc, og harvið eigur málið at viðgerast sum eitt íløgumál.

4. Kto 6109 og 6110 Røkt av bygningum. Nevndin er ivingarsom um, at lækkingin er so stór, og um at peningurin er fluttur til íløgur á øðrum fyrisitingarøkjum, og ikki á tekniska økinum.

**Tekniska nevnd 14. oktober 2013:** Nevndin tekur undir við stóru lækkingini av kto 6109 og 6110 á kr. 5,116 mió, treytað av:

1. at kto 8210 Gøtuljós, verður hækkað við kr. 300 tús. til øktar el-orkuútreiðslur
2. at kto 8111 Reinhaldið, verður hækkað við kr. 400 tús. til nýtt rakstrarstað sum er wc í Steinatúni
3. at kr. 1,0 av lækkingini verður nýtt til íløgu innan tekniska økið, til at gera nýtt wc og bussendastøð við Sjógv í Kollafirði
4. at lækkingin av kto 6109 og 6110 er grundað á serligar umstøður, og einans er galdandi fyri 2014, og tískil ikki er útgangsstøði fyri fíggjarætlanini fyri 2015.

**Trivnaðarnevndin 21. oktober 2013:** Nevndin samtykti fíggjarætlanina, men mælir til, at konta 2640 Stuðul til endamál innan almanna- og heilsumál verður hækkað við kr. 600.000. Endamálið er at umskipa játtanina soleiðis, at tað í størri mun verður talan um at fíggja verkætlanir og menningarætlanir, sum nevndin tekur stig til.

**Mentamálanevndin 21. oktober 2013:** Nevndin samtykti fíggjarætlanaruppskotið sum heild við hesum broytingum:

- At játtað verður kr. 890.000 til framhald av frítíðartilboðnum til 3. flokk
- At játtað verður kr. 350.000 til frítíðarskúlaøkið at hava opið í tíðarskeiðum, tá skúlar hava frí
- At játta kr. 100.000 til Tórshavnar Ungdómsráð
- At játta kr. 200.000 til verkætlanar á ungdómsøkinum – nýggj rakstrarkonta stovnast á grein 3
- At fíggja hetta við at framflyta minninýtslu í inniverandi ári á kontu 3215 ætlað ungdómsvirksemi kr. 790.000 og við at tillaga normeringina á frítíðarskúlunum við kr. -750.000.
- At ongar broytingar verða gjørdar í brúkaragjøldunum í Svimjihøllini, og at inntøku- og útreiðslukarmurin tí lækkar kr. 425.000.
- At nýggj rakstrarkonta verður stovnað á grein 5 til skoytibreytina.

| Konta | Kontuheitið | Lækkar | Hækkar | Viðm. |
|---|---|---|---|---|
| 1315 | Nevndir og ráð | | 100 | Rakstur av Tórsh. Ungdómsráð. Heldur enn at stovna nýggja kontu, er ikki skilabest at játtanin fer inn á 1315, har sum eldraráðið eisini er? |
| 3215 | Aðrar útreiðslur barnaansing | | 350 | Frítíðarskúlar opið, tá skúlar hava stongt |
| 3215 | Aðrar útreiðslur barnaansing | | 100 | Frítíðarskúlalíknandi tilboð 3. fl - tá vit kenna meira fyri vist, hvussu hetta, ella alternativt eitt klubbatilboð til 3.-5. fl, verður skipað, ber til stovna serstaka kontu. |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| xxxx | Verkætlanir á ungdómsøkinum | | 200 | Stovnast skal nýggj konta á grein 3 børn og ung |
| | Normeringsbroyting frítíðarskúlar 1.-2. fl | 750 | | Nýggjur lykil 2,4, áleið kr. 750.000 |
| | **Í alt** | **750** | **750** | **0** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 5610 | Svimjihøllin | 0 | 0 | Ætlað hækkan í inntøkum og samsvarandi útreiðslukarmi kr. 425 ikki samtykt, nettoútreiðslukarmur tó óbroyttur |
| xxxx | Skoytibreytin | | 530 | Stovnast nýggj konta |
| 5717 | ítróttaranlegg | 530 | | Skoytibreyt tikin úr |
| | **Í alt** | **530** | **530** | **0** |

Um kr. 790.000 verða tøkar við árskifti á 3215, so skal hetta nýtast til framhald av frítíðarskúlatilboðnum til 3. flokk í 2014

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við fíggjarætlanini við teimum broytingum, sum eru samtyktar av mentamálanevndini.

Viðvíkjandi broytingunum hjá teknisku nevnd og trivnaðarnevndini tekur fíggjarnevndin ikki undir við at hækka raksturin og at stovna nýggja íløgukonto til wc í Kollafirði, og verður málið beint aftur í ávikavist teknisku nevnd og trivnaðarnevndina við atliti til at finna fígging innanfyri egin rakstrarstøð.

**Ískoyti:**
Mett verður ov stórt inntriv í rakstrarstøðini á grein 2 at fíggja kr. 600.000 til verkætlanir og menningarætlanir innanfyri karmin. Skotið verður upp ein lægri upphædd kr. 200.000, sí yvirlitið niðanfyri.

| **Konta** | **Kontuheiti** | **Hækkar** | **Lækkar** |
|---|---|---|---|
| 2101 | Naina | | 35 |
| 2510 | Serflutningsskipanin | | 35 |
| 2613 | Børn sett heiman í fosturfamilju | | 30 |
| 2615 | Pedagogisk frípláss | | 25 |
| 2617 | Brúkaragjøld, serstovnar | | 30 |
| 2745 | Tiltøk á eldraøkinum | | 15 |
| 2810 | Fíggjarligt frípláss | | 30 |
| 2460 | Stuðul til endamál innan almanna- og heilsumál | 200 | |
| Í alt | | 200 | 200 |

Harumframt verður mett neyðugt at orða kontuheitið og játtanartekstin til kontu 2460 av nýggjum. Kontuheitið kann vera: “Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið”.

Játtanarteksturin kann vera hesin: "Endamálið við játtanini er at stuðla tiltøkum og at skipa verkætlanir og menningarætlanir o.líkn. innan almanna- og heilsuøkið."

**Trivnaðarnevndin 28. oktober 2013:** Samtykt at taka undir við uppskotinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Við eini samanbering av fíggjarætlanini fyri 2013 og framlagda uppskotinum fyri 2014 kann staðfestast, at broytingar eru í rakstrarjáttanum á fleiri økjum:

§1 Kommunal fyrisiting, hækkar samanlagt kr. 217 tús.
§2 Almannamál og heilsumál, hækkar samanlagt kr. 4.450 tús.
§3 Børn og ung, lækkar samanlagt kr. -3.920 tús.
§4 Undirvísing, hækkar kr. 170 tús.
§5 Mentan og frítíð, lækkar kr. -68 tús.
§6 Teknisk mál, lækkar kr. -5.248 tús.
§7 Kommunal virkir, hækkar kr. 2.582 tús.

Staðfestast kann, at §6 stendur fyri tí størstu lækkingini, harav konto 6109 og 6110, Umsiting og røkt av bygningum, einsamallar standa fyri einari lækking á kr. -5.116 tús.

Nevndin hevur á fundi 14. okt. 2013 umrøtt stóru lækkingina av konto 6109 og 6110, og tekur sum útgangsstøði ikki undir við eini niðurraðfesting av røkt og umsiting av kommunalum bygningum. Av tí at talan er um serligar umstøður í 2013, og við teirri fortreyt, at henda lækking ikki liggur til grund fyri framskrivingum og játtanum í 2015, er nevndin tó sinnað at taka undir við lækkingini, bert galdandi fyri 2014.

Tá talan er um íløgur, staðfestir nevndin, at játtanin til §6 Teknisk mál, er lækkað í mun til langtíðar íløguætlanina fyri 2014, sum var gjørd í sambandi við íløguætlanina fyri 2013. Størsta lækkingin stavar frá, at játtanin á 30 mió. til Brúgv um Sandá, er flutt til 2015, men hóast hædd verður tikin fyri hesi forskjóting, so lækkar játtanin til §6 lutfalsliga úr kr. 46,7 mió. í 2013 til kr. 43 mió. í 2014, hóast at samlaða íløguætlanin hækkar við nærum 12 mió. kr., úr kr. 98,291 mió. í 2013 til kr. 110 mió. í 2014. Staðfestast kann tí, at lækkingin av rakstrinum á §6, verður ikki nýtt til meiríløgur undir §6, men á øðrum fyrisitingarøkjum.

Henda raðfesting í uppskotinum til fíggjarætlan ger, at trupult er at finna fíggjarligt rásarúm fyri nýggjum tænastum til borgarar, sosum alment wc í Steinatúni o.l., og til útreiðslur sum kommunan ikki sjálv stýrir, sosum orkuprísir. Nevndin staðfestir samstundis, at onnur nýggj rakstrarstøð á øðrum fyrisitingarøkjum, verða stovnaði.

Hinvegin metir nevndin tað at verða av stórum týdningi at hava eina góða tænastu við almennum wc í Steinatúni, og somuleiðis at lagt verður upp fyri tí serliga stóru ávirkanini av hækkaðum elorkuprísum á konto 8210 Gøtuljós.

Nevndin er tó av tí áskoðan, at lækkingin av konto 6109 og 6110 er longu frammanundan so stór, at møguleiki er ikki hjá nevndini at gera uppaftur størri umraðfestingar fyri tørvinum á kr. 300 tús. til konto 8210 Gøtuljós og kr. 400 tús. til konto 8111 Reinhald, av konto 6109 og 6110.

**Tekniska nevnd 29. oktober 2013:** Nevndin tekur undir við uppskotinum til fíggjarætlan fyri tær konti undir §6 og §7, sum tekniska nevnd varðar av, við hesum broytingum:

1. Kto 8210 Gøtuljós: Hædd er ikki tikin fyri, at el-orkuprísirnir eru munandi hækkaðir seinastu árini, eins og umfangið av el-útreiðslum í sambandi við hátíðarhald, so sum ólavsøku, jólabý o.l. somuleiðis er munandi hækkað. Kommunan hevur ikki møguleika at stýra el-prísinum, og tá hesin partur er so stórur partur av konto 8210, má játtanin til hetta hækkast við kr. 300 tús.

2. Kto 8111 Reinhald: Virksemið innan hesa konto er økt í 2013, tá wc í Steinatúni kom undir somu upplatingaskipan sum wc í Mylnugøtu. Í uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2014 er ikki tikin hædd fyri hesum nýggja rakstrarstaðnum. Hetta er einasta almenna wc í miðbýnum, har rørslutarnað hava nøktandi atkomumøguleikar. Rakstrarkostnaðurin fyri hetta rakstrarstaðið er kr. 400 tús. árliga, til lønir, el, reingerð o.l.

3. At fíggja hækkingina av konto 8210 við kr. 300 tús. og konto 8111 við kr. 400 tús., við at framflyta minninýtslu í inniverandi ári á konto 7610 Parkingsskipanin.

4. Nevndin samtykti eisini at heita á býráðið um at gera umraðfestingar í uppskotinum til íløguætlan, soleiðis at kr. 1,0 mió. verða játtaðar til íløgu í nýggja bussendastøð við almennum wc við Sjógv í Kollafirði.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2013:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og við pkt. 1-3 hjá teknisku nevnd við teirri viðmerking, at um kr. 700.000 verða tøkar við árskifti á konto 7610 parkeringsskipan, so skal hetta flytast til konto 8210 gøtuljós við 300.000 og 8111 reinhald við kr. 400.000.

Viðv. pkt. 4 í samtyktini hjá teknisku nevnd verður spurningurin um wc-facilitetir við endastøðir hjá bussleiðini tikin upp í sambandi við evnisdagin um bussleiðina.

Fíggjarætlanin beind í býráðið.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 13. november 2013:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 20. november 2013:** Umrøtt.

**Fíggjarnevndin 28. november 2013:** Samtykt við aðru viðgerð at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til fíggjarætlan við hesum broytingum:

| Konta | Kontuheitið | Lækkar | Hækkar | Viðm. |
|---|---|---|---|---|
| 1315 | Nevndir og ráð | | 100 | Rakstur av Tórsh. Ungdómsráð. |
| 3215 | Aðrar útreiðslur barnaansing | | 350 | Frítíðarskúlar opið, tá skúlar hava stongt |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 3215 | Aðrar útreiðslur barnaansing | | 100 | Frítíðarskúlalíknandi tilboð 3. fl - tá vit kenna meira fyri vist, hvussu hetta, ella alternativt eitt klubbatilboð til 3.-5. fl, verður skipað, ber til stovna serstaka kontu. |
| 3216 | Verkætlanir á ungdómsøkinum | | 200 | Stovnast skal nýggj konta á grein 3 børn og ung |
| | Normeringsbroyting frítíðarskúlar 1.-2. fl | 750 | | Nýggjur lykil 2,4, áleið kr. 750.000 |
| | **Í alt** | **750** | **750** | **0** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 5610 | Svimjihøllin | 0 | 0 | Ætlað hækkan í inntøkum og samsvarandi útreiðslukarmi kr. 425 ikki samtykt, nettoútreiðslukarmur tó óbroyttur |
| xxxx | Skoytibreytin | | 530 | Stovnast nýggj konta |
| 5717 | ítróttaranlegg | 530 | | Skoytibreyt tikin úr |
| | **Í alt** | **530** | **530** | **0** |

Um kr. 790.000 verða tøkar við árskifti á 3215, so skal hetta nýtast til framhald av frítíðarskúlatilboðnum til 3. flokk í 2014

| **Konta** | **Kontuheiti** | **Hækkar** | **Lækkar** |
|---|---|---|---|
| 2101 | Naina | | 35 |
| 2510 | Serflutningsskipanin | | 35 |
| 2613 | Børn sett heiman í fosturfamilju | | 30 |
| 2615 | Pedagogisk fripláss | | 25 |
| 2617 | Brúkaragjøld, serstovnar | | 30 |
| 2745 | Tiltøk á eldraøkinum | | 15 |
| 2810 | Fíggjarligt fripláss | | 30 |
| 2460 | Stuðul til endamál innan almanna- og heilsumál | 200 | |
| Í alt | | 200 | 200 |

Harumframt verður mett neyðugt at orða kontuheitið og játtanartekstin til kontu 2460 av nýggjum. Kontuheitið kann vera: "Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið". Játtanarteksturin kann vera hesin: "Endamálið við játtanini er at stuðla tiltøkum og at skipa verkætlanir og menningarætlanir o.líkn. innan almanna- og heilsuøkið."

Um kr. 700.000 verða tøkar við árskifti á konto 7610 parkeringsskipan, skal hetta flytast til konto 8210 gøtuljós við 300.000 og 8111 reinhald við kr. 400.000.

Eisini samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við hesum broytingum:

Kr. 700.000 verða játtaðar til økismenning, kr. 425.622 til forskúlatilboð, kr. 574.378 til frítíðarskúlatilboð og kr. 300.000 til Heilræði. At fíggja hetta verða hesar kontur lækkaðar soljóðandi:

- Húsaumsitingin § 6, konta (6109/6110) kr. 1.000.000
- Skeið § 1, konta 1313 kr. 100.000
- Konsulenthjálp §1, 1314 kr. 200.000
- Serkøn hjálp § 6 , 6110 kr. 400.000
- Aðrar útreiðslur § 3 kr. 300.000

Broytingarnar eru sum lýst í niðanfyristandandi talvu:

| Konta | Kontoheitið | lækkar | hækkar | viðm. |
|---|---|---|---|---|
| 4121 | Skúlin á Argjahamri | | 1.044.000 | Forskúlatilboð |
| 6110 | Umsiting og røkt av bygningum | 1.000.000 | | |
| 4119 | Sankta Frans Skúli | 211.000 | | Gjald |
| 3199 | Regulering barnatal | 409.000 | | |
| 3216 | Verkætlanir á ungdómsøkinum | | 576.000 | |
| Í alt | | 1.620.000 | 1.620.000 | |
| | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1316 | Effektivisering/menning og strategi | | 700.000 | Játtanin er til at fylgja upp uppá politisku visjónina fyri økismenning í Tórshavnar kommunu. Játtanin fer til at fáa til vega vitan um almenn viðurskifti, sum skal brúkast í arbeiðinum at gera økismenningarpolitikk, og virksemisætlanir í arbeiðinum at menna og dagføra økini. |
| 2743 | Vitjanartænastan | | 300.000 | |
| 1313 | Tekniska fyrisiting | 100.000 | | Skeið |
| 1314 | Kunningartøkni | 200.000 | | Konsulenthjálp |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 6110 | Umsiting og røkt av bygningum | 400.000 | | Serkøn hjálp |
| 3215 | Aðrar útreiðslur | 300.000 | | |
| Í alt | | 1.000.000 | 1.000.000 | |

Harafturat varð samtykt fyrst í komandi ári at endurskoða fíggjarætlanina 2014 við fleiri effektiviseringum fyri eygað.

Eisini samtykt at mæla býráðnum til at áseta kommunuskattaprosentið í 2014 til 20,25 og at áseta barnafrádráttin til 8.000 kr.

**Býráðið 28. november 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:** Stjórnin hevur sett í gongd hesar effektiviseringstilgongdir:

**Húsavarðatænastan** verður miðsavnað og funktiónsskipað. Hetta sparir nøkur størv umframt útreiðslur til veitingar og innkeyp. Tað er trupult at siga neyvt, hvussu nógv verður spart í 2014, men í fíggjarætlanini eru higartil lagdar sparingar inn á kr. 6,5 mió kr.

**Reingerð** verður útveitt. Hetta er fyribils gjørt í fyrisitingini, men ætlanin er at kanna fyrimunir og vansar við at útveita reingerðina á fleiri økjum. Sparast kunnu uml. 200.000 kr., sum partvíst fáa virkna í 2014.

**Tryggingarpolitikkur** er liðugt orðaður at leggja fyri fíggjarnevndina, og í løtuni verður tilgongdin at gjøgnummeta og tillaga tryggingar hjá kommununi fyrireikað. Møguligt er at spara 1 mió kr. í 2014 og fleiri sparingar eru møguligar í 2015.

**Á dagstovnaøkinum** ber til at spara við at umleggja og skipa tilgongdir øðrvísi. Í 2014 ber til at spara 500.000 kr. við at miðsavna og miðstýra menningarvirksemi, supervisjón, ráðgeving og nýtslu av sjúkraavloysarum v.m. Tilgongd er harumframt byrjað at umleggja tilboðið á dagstovnaøkinum, soleiðis at børn kunnu ansast parttíð, hetta fer væntandi at broyta/lækka normeringstørvin. Samstundis er ætlanin at fáa eina neyvari stýring av gagnnýtsluni av starvsfólkatilfeinginum fyrst og fremst við neyvari eftirliti og góðkenning av øllum setanum.

**Innkeypspolitikkur** er um at verða liðugt orðaður at leggja fyri fíggjarnevndina. Ætlanin er at bjóða fleiri øki út eftir skipaðum leisti. Royndir, sum higartil hava verið gjørdar vísa sparimøguleikar á uml. 10 %.

**Spariuppskot 2014**

| | |
|---|---|
| Fyrisiting (1313) | 1,5 mió kr. |
| Børn & ung (3215) | 500.000 kr. |
| Tryggingar | 1 mió kr. |
| Áir, yvirflatuvatn... (6811) | 300.000 kr. |

| | |
|---|---|
| Reyn ( 6211) | 300.000 kr. |
| Reyn ( avlop á 6211 í 2013) | 300.000 kr. |
| Umhvørvistiltøk (6610 og 6611) | 400.000 kr. |

**Fíggjarnevnd 19. februar 2014:** Samtykt at taka undir við fyriliggjandi uppskoti og at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevnd 24. februar 2014:** Samtykt at taka undir við niðanfyristandandi broytingum í fíggjarætlanini fyri 2014 og at beina málið í býráðið:

**Umraðfesting og sparingar**

*Íløguætlan við framflytingum 2013*

| | | |
|---|---|---|
| 4176 | Nýggjur Vesturskúli, fyrireiking | 2.923.000 |
| 5375 | Framfluttur løgukarmur, Boðanesgjógv | 549.000 |
| 5375 | Mullers Pakkhús - umvæling | 354.000 |
| 5775 | Golfvøllur | 2.000.000 |
| 5775 | Skúla - og ítróttarhøll í Kollafirði | 1.800.000 |
| 6275 | Vaglið | 979.000 |
| 6575 | Kirkjugarðar, framfluttur løgukarmur | 1.000.000 |
| 8175 | framfluttur løgukarmur, gongugøtan | 2.000.000 |
| 8175 | Sundsvegur dagføring | 4.900.000 |
| 8175 | Ljósregulering Eystari Ringvegur/Hvítanesvegur | 133.000 |
| 8175 | Umlegging av Sundsvegnum | 498.000 |
| 8175 | Súkklubreytir | 1.000.000 |
| | | **18.136.000** |

*Íløguætlan 2014*

| | | |
|---|---|---|
| 5775 | Ítróttarhøll inni í Víka á Argjum | 1.000.000 |
| 5775 | Ítróttarhøll við Landavegin | 9.000.000 |
| 5775 | Oyggjaleikir/Golfvøllur | |

| | | |
|---|---|---|
| | | 3.000.000 |
| 5775 | Baðiland | 1.000.000 |
| 6275 | Fríðkan av býnum | 2.000.000 |
| 6275 | Miðbýarætlan | 4.000.000 |
| 6275 | Spælipláss í miðbýnum | 1.000.000 |
| 8175 | Gongugøtan | 1.000.000 |
| 8175 | Súkklubreyt | 1.000.000 |
| | | **23.000.000** |

*Sparing rakstur 2014*

| | | |
|---|---|---|
| 1313 | Tekniska fyrisiting | 1.500.000 |
| 3215 | Aðrar útreiðslur Børn og ung | 500.000 |
| 6211 | Aðrar útreiðslur (Tinganes og gamla Havnin | 600.000 |
| 6610 | Umhvørvistiltøk a.a. | 200.000 |
| 6611 | Aðrar útreiðslur (Umhvørvistiltøk) | 200.000 |
| 6811 | Áir, yvirflatuvatn og veitir | 300.000 |
| | Trygging | 1.000.000 |
| | | **4.300.000** |

**Umraðfesting og sparingar tilsamans** **45.436.000**

**Raðfesting 2014**

| | | |
|---|---|---|
| 1312 | Fyrireiking av yvirtøku av eldraøkinum | 1.000.000 |
| 3175 | Dagstovnur í Kollafirði | 10.000.000 |
| 3175 | Birkilund | 1.800.000 |
| 5717 | Hallarleiga | 1.350.000 |
| 5775 | Høll í Gundadali | 19.000.000 |
| 5775 | Judo og borðtennishøll | 7.000.000 |

| | | |
|---|---|---|
| 5775 | Vøllur í Hoyvík | 1.000.000 |
| 5775 | Ítróttarøki á Argjum | 4.200.000 |
| | | **45.350.000** |

**Býráðsfundir 4. mars 2014:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Elin Lindenskov um at raðfesta Sundsvegin við 4,9 mió., súkklubreytir við 1 mió. og spalipláss við 1 mió. at taka av raðfesting til Høll í Gundadali, ið lækkar við 6,9 mió, ið fall við 2 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Elin Lindenskov og Halla Samuelsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Tróndur Sigurdsson, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal, Bjørghild Djurhuus, Sigrún Mohr, Jákup Dam og Helena Dam á Neystabø.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Jákup Dam, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Bjørghild Djurhuus.

Greiddu ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal, Sigrun Mohr og Elin Lindenskov.

## 32/14 Valbjørn Dalsgarð : Umsókn um byggiloyvi til 6 randarhús á matr. nr. 42a, Argir. Atkomuvegur Hóvabrekka

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 19.02.2014 | 10/14 | 14/00389-115 |
| 2 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 32/14 | 14/00389-115 |

**Lýsing av málinum - samandráttur:**

Valbjørn Dalsgaard hevur í skrivi, dagf. 15. mars 2002, søkt um loyvi at byggja randarhús á matr. nr. 42a, Argir (Revatrøðin), og hevur í skrivi, dagf. 10. juli 2002, frá umsitingini fingið upplýst, at umsóknin um byggiloyvi ikki kann viðgerast vísandi til, at Hóvabrekka ikki er kommunalur vegur, og at atkomuviðurskiftini til omanfyri nevnda matrikul eru ógreið.

Valbjørn Dalsgaard hevur sett seg í samband við eigaran av matr. nr. 56 ca, sum er Føroya landsstýri (almanna- og heilsumálaráðið og mentamálaráðið). Ráðini hava sett seg í samband við Landsverkfrøðingsstovnin fyri at fáa eina tekniska meting av málinum, og í skrivi, dagf. 11. mars 2004, frá Landsverkfrøðings-stovninum verður mælt frá at økja um nýtsluna á Hóvabrekku, vísandi til hallið á brekkuni og útsýnið móti Reynsgøtu.

Hóvabrekka er ikki gjørd sambært teimum teknisku ásetingunum, ið eru galdandi í dag, og vildi tískil ikki verið góðtikin sum atkomuvegur. Men við tað at Argja kommuna í síni tíð hevu latið gera slíkar atkomuvegir, sum ongantíð eru yvirtiknir, og at hesir hava verið nýttir í mong ár, er neyðugt hjá teknisku nevndini at taka støðu til atkomuviðurskifti á Hóvabrekku, og um kommunan skal yvirtaka Hóvabrekku – hetta í sambandi við fyriliggjandi umsókn frá Valbjørn Dalsgaard.

**Tilmæli:**

Tað fer ikki at bera til at broyta hallið á Hóvabrekku, og tað verður trupult at betra um útsýnisviðurskiftin frá Hóvabrekku út móti Reynsgøtu. Men við tað at talan er um eitt íbúðarøki, og at Hóvabrekka verður beinkað og at gjørd verður gongubreyt, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til, at nevndin tekur undir við fyriliggjandi uppskoti frá Valbjørn Dalsgaard at gera Hóvabrekku - tó við teirri broyting, at útsýnisviðurskiftini verða broytt samsvarandi uppskoti frá umsitingini

**Tekniska nevnd 4. mai 2004:** Nevndin er sinnað at loyva atkomu eftir Hóvabrekku til bygging á matr. nr. 42a treytað av,

at vegurin verður gjørdur 6 m breiður, umframt gongubreyt á aðrari síðuni.
at útsýnið út á Traðagøtu verður betrað.
at umsøkjarin fær eina avtalu við eigaran av ognini á matr. nr. 42b, har vegurin skal gerast.
at vegurin annars lýkur tær treytir, sum kommunan setir til kommunalar vegir.
at projekt verður lagt fyri nevndina aftur til góðkenningar.

**Ískoyti:**

Valbjørn Dalsgaard hevur havt samráðingar við almanna- og heilsumálaráðið um nýtslurætt á Hóvabrekku í sambandi við ætlan hansara um at byggja á matr. nr. 42a, Argir (eigari: sp/f Valbjørn Dalsgaard).

Hann hevur víst á, at almanna- og heilsumálaráðið hevur sett sum treyt, at eingin ferðslurættur skal verða til matr. nr. 41a, Argir (eigari: Marita Blástein v.fl). Henda ognin hevur bert atkomumøguleika til Hóvabrekku, tí tað fer at verða trupult at gera atkomuveg oman í Traðargøtu vegna vánaligt útsýni og plásstrot millum verandi ognirnar, matr. nr. 41b og 42h, Argir.

Umsitingin er av teirri áskoðan, at treytirnar, sum almanna- og heilsumálaráðið nú ætlar at seta, ikki eru í samsvari við heildarætlanina á økinum, sum Argja kommuna á sinni hevur latið gera.

Ynski er, at nevndin tekur støðu til, um kommunan skal halda fast við, at ognin matr. nr. 41a, Argir, skal hava atkomurætt frá Hóvabrekku ella ikki.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at nevndin heldur fast við, at ognin matr. nr. 41a, Argir, skal hava atkomurætt frá Hóvabrekku og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina til endaliga staðfesting.

**Tekniska nevnd 14. desember 2004:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum og heitir á nevndina um reisa málið um yvirtøku av Hóvábrekku og beina málið í teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. februar 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at kommunan ognar sær lendið undir Hóvabrekku og at beina málið í fíggjarnevndina at taka støðu til gjald fyri íbinding v.m. hjá umsøkjaranum.

**Tekniska nevnd 8. desember 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2006:** Samtykt at taka upp samráðingar um at kommunan ognar sær Hóvabrekku.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at Tórshavnar kommuna yvirtekur vegin Hóvabrekka sambært uppskoti um avtalu við eigaran.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. januar 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at Tórshavnar kommuna yvirtekur vegin Hóvabrekka sambært uppskoti um avtalu við eigaran.

**Tekniska nevnd 17. januar 2008:** Tekniski stjórin gjøgnumgekk uppskot til avtalu.
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 31. januar 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

- Í sambandi við samráðingar við eigararnar av Hóvabrekku, eru ymisk viðurskfti, ið Landsverk hevur kravt, sum kunnað verður um.

**Tekniska nevnd 21. august 2008:** Kunnað varð um málið.

- Umsitingin leggur fram uppskot uv vegaføring, sum Landsverk kann taka undir við. Tekniska nevndin skal taka støðu til uppskot nr. 2.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Eingin peningur er settur av til verkætlanina. Metti kostnaðurin fyri sjálvt vegarbeiðið er uml. 1,5 - 2,0 mió. svarandi til ein meturprís álj. kr. 15.000,-. Tá eru útreiðslur fyri lendi ikki íroknað.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at arbeitt verður víðari við at detailprojektera, og at arbeiðið verður boðið út í innbodna lisitatión.

**Tekniska nevnd 7. oktober 2008:** Vísandi til umfatandi krøvini frá Landsverki fyri at yvirtaka vegin, samtykti nevndin at heita á býráðið um at kæra málið til Føroya landsstýri.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 27. november 2008:** Einmælt samtykt.

- Kunnað verður um status í málinum.

**Tekniska nevnd 12. november 2009:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Kæra varð hin 26. jan. 2009 send Innlendismálaráðnum, um handfaring og treytirnar hjá Landsverk í samband við ætlaðu yvirtøkuna av Hóvabrekku, hjá Tórshavnar kommunu (j. nr. 2009-0790/72).

Hin 19. febr. 2010 hevur Innlendismálaráðið tikið støðu til kæruna. Kommunan fær ikki viðhald við tí grundgeving, at tað eru kommunal krøv til vegabreidd sum gera, at neyðugt er at takað lendi burturav matr. nr. 56ca og 55cc.

Málið er síðani viðgjørt á stjórnarfundi hin 09. mars 2010, og mælir stjórnin til, at leggja málið fyri byggi- og býarskipanarnevndina við tilmæli um, at kommunan ikki gera meira við málið um sundurbýtið av matr. nr. 42a, vísandi til at yvirtøkutreytirnar viðføra stórar útreiðslur fyri kommununa. Stjórnin umrøddi eisini spurningin, at tekniska nevnd eigur at viðgerða og takað støðu til, um kommunan skal seta verandi eigara av Hóvabrekku krav um, at vegurin verður gjørdur í tann stand sum landsstýrisins egni vegamyndugleiki, Landsverk, krevur innanfyri rímiliga freist, um vegurin framhaldandi skal nýtast sum atkomuvegur til Verkstaði Vón v.m.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til

1. **at** nevndin tekur støðu til, at kommunan ikki yvirtekur Hóvabrekku undir teimum treytum sum Landsverk setir, og at beina málið í býráðið um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina
2. **at** nevndin tekur støðu til, um kommunan skal seta verandi eigara av Hóvabrekku krav um, at vegurin verður gjørdur í tann stand sum landsstýrisins egni vegamyndugleiki, Landsverk, krevur innanfyri rímiliga freist, um vegurin framhaldandi skal nýtast sum atkomuvegur til Verkstaði Vón v.m.
3. **at** umsitingin setir seg í samband við eigaran av matr. nr. 42a, Argir at greiða frá støðuni í málinum, herundir kostnaðinum av yvirtøkuni, og hvat tað vil viðføra av útreiðslum fyri privatu útstykkingarætlanina av matr. nr. 42a.

4. **Tekniska nevnd 8. apríl 2010:** Nevndin samtykti at:

1) kommunan ikki yvirtekur Hóvabrekku undir teimum treytum, sum Landsverk setur og beinir málið í býráðið um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina
2) kommunan skal seta verandi eigara av Hóvabrekku krav um, at vegurin verður gjørdur í tann stand, sum landsstýrisins egni vegamyndugleiki krevur

3) umsitingin setur seg í samband við eigaran av matr. nr. 42a, Argir at greiða frá støðuni í málinum.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og teimum grundgevingum, ið nevndin hevur lagt til grund fyri avgerðini.

- Jan Christiansen fór av fundi, meðan hetta málið var til viðgerðar.

**Býráðið 28. apríl 2010:** Býráðið tekur til eftirtektar, at málið ikki hevur verið fyri aftur í byggi- og býarskipanarnevndini, og verður mett, at hetta ikki er neyðugt í hesum ítøkiliga førinum.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum.

- Sjúrður Olsen ynskir at viðgera málið.

**Tekniska nevnd 22. november 2012**: Nevndin samtykti at taka upp samráðingar við Landsverk um loysn av málinum í sambandi við onnur líknandi mál, herundir mál nr. 2012-2427 – Yvirtøka av landsvegi í Kirkjubø.

**Fíggjarnevndin 26. november 2012:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, saman við umboðum frá Almanna- og mentamálaránum og Landsverki, havt samskifti um eina tekniska loysn av Hóvabrekku. Partarnir, ið umsitingin hevur samskift við, hava tikið útgangsstøði í, at Hóvabrekka ikki skal gerast ótryggari at ferðast á fyri búfólkini á stovnunum eftir eina møguliga dagføring.
Partarnir eru vorðnir samdir um ta loysn, ið er skrásett undir j. nr. 2002-0790/110, ið er eitt skitsu uppskot. Tað fyriggur eingin ítøkilig projektering av vegastrekkinum.

Hóvabrekka kemur sambært hesum uppskoti at vera 7 m breið samanlagt, harav 2 m eru settir av til gongubreyt í eystara borði.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Fyriliggjandi skitsu uppskot, fyri arbeiðið at dagføra Hóvabrekku, verður mett at kosta uml. 1,3 mió. kr. Peningur er ikki avsettur á íløguætlanini fyri 2014 til Hóvabrekku. Vegurin er ætlaður til eina privata útstykkinq, og tí skal støða eisini takast til, í hvønn mun kommunan og/ella útstykkjarar skulu luttaka í kostnaðinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at tikið verður undir við teknisku loysnini, sambært skjal 2002-0790/110, og at beina málið í fíggjarnevndina viðv. raðfesting og útvegan av fígging av møguligum kommunalum parti av kostnaðinum.

**Tekniska nevnd 15. januar 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2014:** Útsett til komandi fund.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevnd 19. februar 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd, og at fíggja arbeiðið við at eigarin av matr. nr. 41a luttekur við 23,2% av kostnaðinum og at eigarin av matr. nr. 42a luttekur við 9,5% av kostnaðin, meðan kommunan ber restina av kostnaðinum, sum verður fíggjaður av íløgum fyri 2014, konto 8175 Aðrar vegaverkætlanir, og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 4. mars 2014:** Einmælt samtykt

# 33/14 Útbjóðingartilfar - randarhús - samanbygd hús - Hoyvíkshagin suður

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 05.02.2014 | 23/14 | 14/00627-213 |
| 2 Fíggjarnevnd | 19.02.2014 | 12/14 | 14/00627-213 |
| 3 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 33/14 | 14/00627-213 |

**Samtakið J. & K. Petersen og Sandavágs Timburhandil søkja um at fáa broytt verkætlanina – samanbygd hús á Heiðum í Dýrindalsgøtu í Hoyvík**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Samtakið J&K Petersen og Sandavágs timburhandil søkja í skrivi til Tórshavnar kommunu um at fáa broytt verkætlanina samanbygd hús á Heiðum í Dýrindalsgøtu í Hoyvík, so farið verður aftur til upprunaligu verkætlanina.

Verður umsóknin hjá Samtakinum eftirlíkað merkir hetta, at kommunan ikki fullfíggjar ætlanina um eina almenna gøtu gjøgnum útstykkingina, og at kommunan ikki skal beina burtur tann eina sokkulin í ústykkingini.

Fyri samtakið merkir hetta, at byggjast kann á einum sokkli afturat, so talið á búeindum verður 45 í alt.

Umsóknin inniber matrikulerar broytingar, so matrikuleringin kemur at samsvara við ta upprunaligu ætlanina í verkætlanini.

Ger kommunan av at loyva samtakinum at byggja á sokklinum, ið skuldi beinast burtur, kemur samtakið at rinda fyri hendan sokkulin eina upphædd, ið svarar til hana, ið goldið er fyri hinar sokklarnar í útstykkingini.

Sí notat málinum j.nr. 2006-1424/210.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini mælir fíggjarnevndini til at beina spurningin um at sleppa ætlanini við almennari gøtu gjøgnum útstykkingina í teknisku nevnd og – í tann mun tekniska nevnd mælir til at ganga umsóknini á møti - at taka støðu til, um nevndin er sinnað at selja samtakinum sokkulin, ið skuldi takast burtur, við undirliggjandi lendi.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina spurningin um at sleppa ætlanini við almennari gøtu gjøgnum útstykkingina í teknisku nevnd.
Heðin Mortensen og Annfinn Brekkstein luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Tilmæli:**
Vísandi til at spurningurin um hesa gøtu og gongubrúgv var tætt tengdur at privatu verkætlanini um Stórutjórn, sum má metast at vera dottin niðurfyri, og av tí at aðrir møguleikar eru at sleppa millum raðhúsini til Klingruvegin ella til eina framtíðar gongubrúgv

um hendan vegin, mælir tekniski stjórin til at ganga umsóknini á møti, so farið verður aftur til upprunaligu verkætlanina fyri samanbygdu húsini, treytað av at hinir møguleikarnir, at sleppa ímillum húsini við almennari gongufarleið, verða tryggjaðir, og at beina málið aftur í fíggjarnevndina, at avgreiða sølutreytir v.m.

**Tekniska nevnd 5. februar 2014:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum. Nevndin samtykti harumframt at mæla til, at sølupeningurin fyri sokkulin verður nýttur til at gera gongufarleið, sum eisini tekur hædd fyri súkklandi og rørslutarnaðum, millum Dýrindalsgøta og Klinguna, og at beina málið aftur í fíggjarnevndina, at avgreiða sølutreytir v.m.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevnd 19. februar 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til fundin í teknisku nevnd 5. februar 2014 og at beina málið í býráðið. Peningurin fyri sokkulin skal nýtast til útleggið í sambandi við útstykkingina.

Málið um gongufarleið er eitt sjálvstøðugt mál, ið má takast upp fyri seg í teknisku nevnd.

**Býráðsfundir 4. mars 2014:** Einmælt samtykt.

# 34/14 Spæliðplássið hjá Dr. Ingdridar Meinigheitsbarnagarði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 05.02.2014 | 13/14 | 14/00619-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 19.02.2014 | 13/14 | 14/00619-3 |
| 3 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 34/14 | 14/00619-3 |

## Spæliplássið hjá Dr. Ingdridar Meinigheitsbarnagarði

Dr. Ingridar Meinigheitsbarnagarður hevur víst kommununa á, at spæliplássið hevur átrokandi tørv á ábótum og dagføringum, men hevur stovnurin ikki fígging til hetta. Stovnurin vísir á, at spæliplássið verður ikki bert nýtt til virksemið í barnagarðinum, men er opið fyri almenninginum og verður nógv nýtt av børnum og familjum í miðbýarøkinum.

Dr. Ingridar Meinigheitsbarnagarður er sjálvsognarstovnur. Bæði bygningur og spæliøkið er tí ogn sjálvsognarstovnsins. Virksemið er hinvegin kommunalt skilt á tann hátt, at kommunan tillutar stovninum børn í ansing og fíggjar kommunala partin av kostnaðinum. Stovnurin krevur sjálvur inn foreldragjaldið.

Spæliplássið hjá stovninum er at rokna sum lutvíst alment í mun til, at tað er frítt hjá børnum og familjum at brúka. Tað eru harumframt ikki nógv líknandi spælipláss í miðbýnum. Kommunan kann tí sigast at hava ein áhuga í, at spæliplássið er í góðum standi og trygt, og tí verða við til at fíggja hetta.

Trivnaðarnevndin hevur ikki fígging til spælipláss. Í íløguætlanini fyri 2014 grein 6 teknisk mál er játtan sett av til spælipláss í miðbýnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildini mæla til, at trivnaðarnevndin heitir á teknisku nevnd um at viðgera møguleikan at fíggja dagføring av spæliplássinum av kontu 6275 spælipláss í miðbýnum.

**Trivnaðarnevndin 13. januar 2014:** Samtykt at viðgera málið saman við ætlanini at skipa stovnin kommunalan, sí mál 2013-0533.

**Trivnaðarnevndin 23. januar 2014:** Ein meirluti, Bjørghild Djurhuus, Sigrún Mohr og Tróndur Sigurðsson, taka undir við tilmælinum og beina málið í teknisku nevnd. Harumframt tekur meirilutin undir við at skipa stovnin kommunalan.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum, tí talan er kommunala íløgu í sjálvsognarstovn, sum er privatur, og tí eigur kommunan at hava yvirtikið stovnin, áðrenn íløgur verða gjørdar.

**Ískoyti:**
Talan er um prinsippielt mál, av tí at Trivnaðarnevndin á fundi 23. januar 2014 leggur upp til, at játta part av kommunala íløgukarminum til at gera íløgur í eini privatari ogn.

Tekniski stjórin vísti til ásetingarnar í §11 í kommunustýrisskipanini, og somuleiðis til 4. brot í játtanarreglunum.

Tekniski stjórin vísti til ásetingarnar í § 11 í kommunustýrisskipanini og somuleiðis til 4. brot í játtanarreglunum.

Løgdeildin greiddi frá løgfrøðiligu viðurskiftunum. Mett verður, at heimild er hjá kommununi at gjalda fyri viðlíkahaldsarbeiðinum í hesum førinum, um politisk undirtøka er fyri tí. Hetta grundað á, at kommunan hevur tætt tilknýti til stovnin, sosum at talan er um kommunalt ansingartilboð, at almenningurin hevur atgongd til økið, og at kommunan í fleiri ár hevur rindað stovninum eina árliga upphædd til viðlíkahald.

**Tekniska nevnd 5. februar 2014:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr og Helena D. à Neystabø, mælir til at taka undir við trivnaðarnevndini 23. januar 2014 og játta kr. 150.000,- til viðlíkahald av spæliplássinum.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, vísir til samtyktina í trivnaðarnevndini 13. januar 2014 og mælir til at beina málið aftur í trivnaðarnevndina.

Ein annar minniluti, Bogi Andreasen, tekur støðu á seinni fundi.

Málið beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 19. februar 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein mælir býráðnum frá at samtykkja málið, tí talan er um kommunala íløgu í sjálvsognarstovn, sum er privatur, og tí eigur kommunan at hava yvirtikið stovnin, áðrenn íløgur verða gjørdar.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundir 4. mars 2014:** Atkvøtt varð um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson,
Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Sigrun Mohr, Elin Lindenskov og Bjørghild Djurhuus.

## 35/14 Skúlabygnaður og og skúlabygging í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.02.2014 | 1/14 | 14/00423-46 |
| 2 Býráðsfundir | 30.01.2014 | 24/14 | 14/00423-46 |
| 3 Fíggjarnevnd | 19.02.2014 | 14/14 | 14/00423-46 |
| 4 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 35/14 | 14/00423-46 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í álitinum Fólkaskúlin í Tórshavnar kommunu árini 2012-2021 verður skúlabygnaðurin í kommununi viðgjørdur. Skúlabygnaðurin í kommununi hevur avgerandi ávirkan á bæði íløgutørvin í verandi og nýggjar skúlar og á raksturin, serstakliga tímajáttanina til einstaka skúlan.

Skúlabygnaðurin hevur eisini avgerandi ávirkan á, hvussu undirvísingin kann skipast bæði í mun til lærugreinir, næmingar, lærarar osfr. Tað hevur í hesum sambandi stóran týdning, at skúlabygnaðurin er so skipaður, at hann stuðlar sum best undir undirvísingarliga virksemið og harvið mennir fakliga stigið.

Í álitinum er ein røð av tilmælum, sum fevna um skúlabygnaðin í allari kommununi, og sum byggja á ymisk atlit og fortreytir, ið mett verður hava størst týdning. Talan er um uppskot til ein samanhangandi bygnað, sum tí hevur ávirkan og avleiðingar fyri flest allar skúlarnar í kommununi. Samsvarandi uppskotinum um nýggja bygnaðinum setur uppskotið harumframt út í kortið, hvørjar íløgur skulu gerast komandi árini.

Størsta uppskotið er at byggja nýggjan Vesturskúla og í hesum sambandi niðurleggja Venjingarskúlan og Kommunuskúlan, og at Nám X verður sjálvstøðugur miðbýarskúli. Onnur høvuðsbroyting er at skipa forskúla í

øllum skúlum. Ein triðja høvuðsbroyting er, at skúlaskiftið verður at fylgja býtinum grunddeild (1.-3. fl.), miðdeild (4.-6. fl.) og hádeild (7.-9. fl.).

Í fólkaskúlalógini § 32 er ásett, at ein skúlabygnaður skal verða gjørdur fyri fólkaskúlan í kommununi. Sambært § 47, stk. 6 ger kommunustýrið uppskot um skúlabygnað og broytingar í honum, og sambært § 52, stk. 4 viðger skúlastýrið saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygnað og broytingar í honum. Í teimum kommunum, har tvey ella fleiri skúlastýri eru, velur kommunustýrið ein arbeiðsbólk at viðgera uppskot um skúlabygnað.

Álitið um nýggjan skúlabygnað deils fyri kommununa sum heild, deils fyri einstaka skúlan, verður nú at leggja fyri skúlastýrini, og settur verður arbeiðsbólkur, har kommunan og tey 11 skúlastýrini í kommununi eru umboðað. Úrslitið av hesum verður so aftur at leggja fyri nevnd og býráð.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at álitið verður at leggja fyri skúlastýrini, og at settur verður arbeiðsbólkur umboðandi øll skúlastýri og kommununa at viðgera bygnaðaruppskotið.

**Mentamálanevndin 18. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 24. november 2011:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 18. apríl 2012:** Kunnað varð um niðurstøður frá arbeiðsbólkinum, sum hevur viðgjørt álitið um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021

**Ískoyti:**
Við støði í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingunum frá arbeiðsbólkinum umboðandi skúlastýrini, hevur annar arbeiðsbólkur nú útgreinað eitt konsept fyri nýggjum Vesturskúla (sí máltal 2012-1064). Arbeiðið er fyrsta stigið í fyrireikingunum at byggja henda skúlabygning.

Í nevndu ætlan er Vesturskúlin ein trý-sporaður skúli við forskúla og frítíðarskúla, og sostatt í samsvari við bygnaðin og skúlatilboðini, sum skotin verða upp í álitinum. Trý-sporaði Vesturskúlin er saman við ætlanini at flyta Nám X úr Eysturskúlanum høvuðsfortreyt fyri, at til ber at skipa skúlabygnaðinum fyri alla kommununa eftir uppskotinum í álitinum.

Vísandi til ætlanina at byggja Vesturskúlan (máltal 2012-1064) verður mett neyðugt við politiskari støðutakan til høvuðslinjurnar í uppskotinum til nýggja skúlabygnað fyri alla kommununa.

Hesar høvuðslinjur eru:
- At talið av sporum í høvuðsstaðarskúlunum í hádeild (7.-9. flokk) verður 14
- At Venjingarskúlin og Kommunuskúlin leggja saman í trý-sporaðan Vesturskúla
- At Skúlin á Argjahamri, Hoyvíkar skúli og Skúlin við Løgmannabreyt verða tvey-sporaðir skúlar 1.-9. flokk
- At Eysturskúlin verður tvey-sporaður 1.-6. flokk og fimm-sporaður 7.-9. flokk
- At Sankta Frans skúli verður tvey-sporaður 1.-6. flokk
- At næmingar úr Sankta Frans skúla, Nólsoyar skúla, Velbastaðar skúla, Kaldbaks skúla og Kollafjarðar skúla flyta í 7. flokk í Eysturskúlan
- At Nám X flytur úr Eysturskúlanum

Uppskotið um at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum hongur ikki saman við skúlabygnaðinum, men er mál um skipan av skúlatilboðum.

Landsstýrið skal sambært fólkaskúlalógini § 57, stk. 5 góðkenna skúlabygnað kommununnar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja uppskotið til skúlabygnað fyri alla kommununa samsvarandi høvuðslinjunum omanfyri.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið og til kunningar í fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Kunnað varð um málið

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í skrivi dagf. 19. februar 2013 boðar Mentamálaráðið frá, at Mentamálaráðið góðkennir ikki uppskotið til nýggjan skúlabygnað fyri Tórshavnar kommunu.

Í skrivinum verður víst á, at Mentamálaráðið arbeiðir við broytingum í fólkaskúlabygnaðinum, so at tímar í størri mun verða tillutaði til skúlaøki. Á henda hátt metir Mentamálaráðið, at tað ber til at tillaga fólkaskúlabygnaðin til tey ávísu økini, sum síðan sjálv gera av, í hvørjum hølum undirvíst verður.

Mentamálaráðið hevur ætlanir um at seta eina royndarskipan í verk, har tímatillutanin verður lagað eftir næmingatalinum í hvørjum árgangi. Ætlanin er framhaldandi, at kommunurnar sjálvar skulu gera av, hvørjir skúlabygningar skulu brúkast, men hetta má vera í tráð við fíggjarviðurskifti landsins, og í tráð við hvussu nógvir næmingar eru. Mentamálaráðið vil fegið samstarva við Tórshavnar kommunu viðvíkjandi skúlabygnaðinum í framtíðini og er altíð til reiðar at umrøða spurningin nærri.

Meðan omanfyri nevnda serliga snýr seg um tímajáttanina frá Mentamálaráðnum til skúlarnar, er skúlabygnaðurin eisini tengdur at íløguætlanini hjá kommununi í mun til tørv á skúlabygging og dagføring. Fundir hava verið við skúlastýri serliga í mun til støðuna hjá Venjingarskúlanum, Tórshavnar kommunuskúla og Sankta Frans skúla.

**Mentamálanevndin 13. juni 2013:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr og Bogi Andreasen, samtykti at fáa til vega eina verkætlanar- og tørvslýsing fyri ein miðbýarskúla og Vesturskúla og heita á býráðið um fíggjarnevndina at játta kr. 1.000.000 av kontu 4176 verkætlan L41012 Vesturskúli fyrireiking.

Ein minniluti, Jógvan Arge og Tróndur Sigurðsson, taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 26. juni 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 500.000 av konto 4176, verkætlan L41012 Vesturskúli fyrireiking, at fáa til vega eina tørvslýsing fyri ein miðbýarskúla og Vesturskúla. Umsitingin fær til vega tørvslýsingina í samráð við mentamálanevndina, ið verður at leggja fyri býráðið í seinasta lagi 15. september 2013.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 26. juni 2013.

- Ávegis tørvslýsing verður løgd fram.

**Mentamálanevndin 10. september 2013:** Málið umrøtt. Tørvslýsing verður latin nevndini til víðari viðgerð 15. september 2013.

**Ískoyti:**
Tørvslýsing við heitinum *Skúlabygnaður og skúlabygningar – Tørvslýsing miðstaðarøkið* verður løgd fram at viðgera.

**Mentamálanevndin 9. oktober 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskoti 4 í tørvslýsingini, og at heita á umsitingina um at útgreina bygnað og bygging í mun til ymsu skipanirnar, kostnað, verkseting og tíðarætlan, at leggja fyri nevndina aftur skjótast.

**Mentamálanevndin 21. oktober 2013:** Útgreiningin varð løgd fram. Málið útsett til næsta fund.

**Mentamálanevndin 6. november 2013:** Útsett.

**Mentamálanevndin 10. desember 2013:** Samtykt at heita á umsitingina um tilmæli til arbeiðssetning, har arbeiðsbólkur verður settur at gera uppskot til samskipan og/ella samanlegging av Venjingarskúlanum og Kommunuskúlanum, herundir leiðsluviður-skifti, undirvísing, bygningar v.m. at leggja aftur fyri nevdina á næsta fundi.

- Uppskot til arbeiðsbólk og arbeiðssetning verður lagt fram.

**Ískoyti:**
Í sambandi við uppskotið at byggja nýggjan skúla í vesturbýnum, varð mælt til, at Venjingarskúlin og Kommunuskúlin verða lagdir saman og flyta í henda nýggja skúlan.

Við støði í, at høvuðsstaðarøkið frameftir væntast at hava 12 spor 1.-7. flokk og 13 spor 8.-9. flokk, verður talan um at lækka samlaða talið av sporum við tveimum í mun til bygnaðin í dag. Sum fortreyt fyri hesum liggur eisini ein betri gagnnýtsla av høliskapasiteti í Skúlanum á Argjahamri.

Nýggi skúlin verður tí væntandi tveysporaður 1.-7. flokk og fýrasporaður 8.-9. flokk, har tey bæði eykasporini í framhaldsdeildini eru flokkar úr Sankta Frans skúla. Harumframt skal forskúli og frítíðarskúli verða partur av bygninginum. Atlit eigur at takast til, at til ber at byggja skúlan út seinni.

Eingin endalig tíðarætlan fyriliggur fyri nýggjum skúla. Eingin endalig avgerð er heldur tikin um talið av sporum, men mett verður neyðugt at fyrireika tilgongdina at samskipa undirvísingarvirksemið hjá báðum skúlunum longu nú, herundir næmingatilgongdina, eins og at fyrireika eina bygnaðarliga samanlegging.

Settur verður tí arbeiðsbólkur at gera uppskot til samskipan og/ella samanlegging av Venjingarskúlanum og Kommunuskúlanum.

**Tilmæli:**
Arbeiðsbólkurin skal:

1. Gera uppskot til bygnaðarliga samskipan og/ella samanlegging av skúlunum báðum sum liður í ætlanini um nýggjan skúla, herundir tíðarætlan og meting um fyrimunir og vansar.

2. Gera uppskot til samskipan av øllum undirvísingarvirkseminum hjá skúlunum báðum í verandi virknu høliskørmum við denti á at savna ymsu floksstigini, og at ætlaði nýggi skúlin verður at hava tvey færri spor enn skúlarnir samlað av hava í dag, herundir tíðarætlan.

Arbeiðsbólkurin skal verða liðugur lata uppskot 2. mai 2014.

Arbeiðsbólkurin verður mannaður soleiðis:

- Eitt umboð fyri skúlaleiðsluna í Venjingarskúlanum

- Eitt umboð fyri skúlaleiðsluna í Kommunuskúlanum
- Eitt umboð fyri lærararnar í Venjingarskúlanum
- Eitt umboð fyri lærararnar í Kommunuskúlanum
- Eitt umboð fyri foreldrini í skúlastýrinum í Venjingarskúlanum
- Eitt umboð fyri foreldrini í skúlastýrinum í Kommunuskúlanum
- Eitt umboð fyri mentamáladeildina, sum samstundis verður skrivari
- Trivnaðarstjórin, sum samstundis er formaður

**Mentamálanevndin 8. januar 2013:** Samtykt at taka undir við arbeiðssetninginum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 30. januar 2014:** Málið beint í mentamálanevndina.

**Mentamálanevndin 06. februar 2014**
Hetta er skrásett áður
Mentamálanevndin 6. februar 2014: Samtykt at seta arbeiðsbólk, sum skal:
Gera uppskot til bygnaðarliga samskipan og/ella samanlegging av skúlunum báðum sum liður í ætlanini um nýggjan skúla, herundir tíðarætlan.
Gera uppskot til samskipan av øllum undirvísingarvirkseminum hjá skúlunum báðum í verandi virknu høliskørmum við denti á at savna ymsu floksstigini, og at ætlaði nýggi skúlin verður at hava tvey færri spor enn skúlarnir samlað av hava í dag, herundir tíðarætlan.
Arbeiðsbólkurin skal lata uppskot í seinasta lagi 15. mai 2014.
Arbeiðsbólkurin verður mannaður soleiðis:
Eitt umboð fyri skúlaleiðsluna í Venjingarskúlanum
Eitt umboð fyri skúlaleiðsluna í Kommunuskúlanum
Eitt umboð fyri lærararnar í Venjingarskúlanum
Eitt umboð fyri lærararnar í Kommunuskúlanum
Eitt umboð fyri foreldrini í skúlastýrinum í Venjingarskúlanum
Eitt umboð fyri foreldrini í skúlastýrinum í Kommunuskúlanum
Eitt umboð fyri mentamáladeildina, sum samstundis verður skrivari
Trivnaðarstjórin, sum samstundis er formaður 2

Harumframt samtykti nevndin, at bygginevndin fyri nýggjum Vesturskúla beinanvegin fer undir neyðugu fyrireikingarnar at byggja tvey sporaðan skúla, sum skal kunna víðkast til trísporaðan skúla.
Nevndin samtykti eisini, at Kommunuskúlin verður mentanar- og virksemishús, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 19. februar 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini viðvíkjandi arbeiðsbólkinum og arbeiðinum hjá bygginevndini fyri Vesturskúlan og at beina málið í byráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 4. mars 2014:** Samtykt við 12 atvøðum fyri og ongari ímóti at taka undir við fíggjarnevndini um vesturskúlan og at arbeitt verður víðari við tilmælinum hjá mentamálanevdnini um at kommunuskúlin verður mentunar- og virksemishús.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Greiddi ikki atkvøðu: Elin Lindenskov.

## 36/14 Broyting í reglugerð fyri grundstykkir (2008-1424) (Uppskot um at krevja depositum fyri at standa á bíðilista til fasta ogn til egnan privatan bústað í Tórshavnar kommunu) (2009-1334)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 19.02.2014 | 19/14 | 14/01179-5 |
| 2 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 36/14 | 14/01179-5 |

Lýsing av málinum – samandráttur:

Umsøkjarar, sum eru búsitandi aðrastaðni enn í Tórshavnar kommunu, kunnu einans standa á bíðilista til fasta ogn til privatan bústað, um:

1) teir eru í leystrarørindum ella í arbeiðsørindum fyri føroyska arbeiðsgevara uttanlanda
2) teir flyta til Tórshavnar kommunu í seinasta lagi 2 ár eftir at umsóknin er móttikin

Hetta er ásett í pkt 7b og pkt 8.

Sambært seinastu orðing í pkt 11 hevur tann, ið hevur fingið tillutað ogn í nýggjari útstykking møguleikan at býta ognin við aðra tøka ogn í somu útstykking.

Í sambandi við útstykkingina við Myllutjørn hevði, og hevur enn, henda áseting við sær umsøkjarar og keyparar, ið hava fingið grundstykki, bíða og vóna at onkur letur eitt “betur” grundstykki innaftur, sum tey kunnu býta um við. Av tí, at tað hevur verið rættiliga trupult at sleppa av við stykkini við Myllutjørn, fingið fólk loyvi at skriva seg upp til umbýti, um ávís stykki vóru latin inn aftur, við tí avleiðing at summi stykki eru útlutaði fleiri ferðir og skeyti umskrivaði fleiri ferðir, og byggingin dregur út. Nógv óneyðug og óskynsam umsiting hevur staðið av hesum, umframt at tað kann hugsast at fólk “liggja á” grundstykkjum, tey als ikki ynskja, men kanska onkur annar kundi fingið gleði av.

**Tilmæli**

Til tess at taka burtur forðingar fyri at útisetar og fólk annars uttanfyri Tórshavnar kommunu kunnu skriva seg upp á bíðilistan til fasta ogn til privatan bústað, og soleiðis kunnu planleggja eina framtíð í høvuðsstaðarkommununi, verður mælt til at strika pkt. 7b og 8.

Til tess at forða fyri óneyðugari umsiting og at umsøkjarar leggja seg á ognir, teir ikki ætla sær at nýta, men einans vilja umbýta, verður mælt til pkt 11 verður umorða, so Tórshavnar kommuna kann gera av, um hetta skal lata seg gera.

Niðanfyri er galdandi reglugerð sett upp til vinstu og uppskotið um broyttu reglugerðina sett upp til høgru.

Fyrisitingarstjórin og kommunustjórin mæla til, at reglugerðin verður broytt sum umrøtt.

| **Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað** | |
|---|---|
| | |

| Galdandi reglugerð | Uppskot til broytta reglugerð |
|---|---|
| 1.Reglurnar eru galdandi fyri umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað frá Tórshavnar kommunu. | 1.Reglurnar eru galdandi fyri umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað frá Tórshavnar kommunu. |
| Somuleiðis eru reglurnar galdandi fyri útlutan av føstum ognum frá teimum, sum hava fingið lendi til vega frá Tórshavnar kommunu við tí treyt, at ognir, ið verða bygdar á lendið, verða útlutaðar sambært hesum reglum. | Somuleiðis eru reglurnar galdandi fyri útlutan av føstum ognum frá teimum, sum hava fingið lendi til vega frá Tórshavnar kommunu við tí treyt, at ognir, ið verða bygdar á lendið, verða útlutaðar sambært hesum reglum. |
| Yvirlit yvir tílík byggjaríir kann fáast við at venda sær til Snarskivuna ella á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu. | Yvirlit yvir tílík byggjaríir kann fáast við at venda sær til Snarskivuna ella á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu. |
| 2. Skilt verður millum niðanfyri standandi sløg av føstum ognum:<br>a) Grundstykki.<br>b) Sambygt hús, so sum tvíhús, raðhús og líknandi.<br>c) Íbúð. | 2. Skilt verður millum niðanfyri standandi sløg av føstum ognum:<br>a) Grundstykki.<br>b) Sambygt hús, so sum tvíhús, raðhús og líknandi.<br>c) Íbúð. |
| 3. Bíðilisti verður gjørdur til hvørt slag av fastari ogn, ið er nevnd undir 2 a-c. Tórshavnar kommuna skilar sær rætt til at goyma fimm tey fremstu plássini á hvørjum bíðilista til umsøkjarar við bráðfeingis tørvi. | 3. Bíðilisti verður gjørdur til hvørt slag av fastari ogn, ið er nevnd undir 2 a-c. Tórshavnar kommuna skilar sær rætt til at goyma fimm tey fremstu plássini á hvørjum bíðilista til umsøkjarar við bráðfeingis tørvi. |
| 4. Við at lata inn eitt umsóknarblað og rinda 3.000 kr. í depositum standa tygum á bíðilista til øll sløg av føstum ognum, ið verða bjóðað út av kommununi.<br>Um tygum ikki ynskja at standa á bíðilista til eitt ella fleiri sløg av føstu ognunum, nevnd undir 2 ac, kunnu tygum velja hesi frá á umsóknarblaðnum.<br>Um tygum seinni velja at søkja um eitt slag av teimum føstu ognunum, sum tygum upprunaliga hava valt frá, skulu tygum lata nýtt umsóknarblað inn hesum viðvíkjandi.<br>5. Tygum verða skrásett/ur á teimum ymisku bíðilistunum í raðfylgju eftir tí dagfesting, tá umsóknarblaðið er móttikið á býráðnum. | 4. Við at lata inn eitt umsóknarblað og rinda 3.000 kr. í depositum standa tygum á bíðilista til øll sløg av føstum ognum, ið verða bjóðað út av kommununi.<br>Um tygum ikki ynskja at standa á bíðilista til eitt ella fleiri sløg av føstu ognunum, nevnd undir 2 ac, kunnu tygum velja hesi frá á umsóknarblaðnum.<br>Um tygum seinni velja at søkja um eitt slag av teimum føstu ognunum, sum tygum upprunaliga hava valt frá, skulu tygum lata nýtt umsóknarblað inn hesum viðvíkjandi.<br>5. Tygum verða skrásett/ur á teimum ymisku bíðilistunum í raðfylgju eftir tí dagfesting, tá umsóknarblaðið er móttikið á býráðnum. |
| 6. Tygum kunnu á umsóknarblaðnum velja at skráseta tygum fyri fleiri av teimum landafrøðiligu økjunum í kommununi, sum eru nevnd á umsóknarblaðnum. | 6. Tygum kunnu á umsóknarblaðnum velja at skráseta tygum fyri fleiri av teimum landafrøðiligu økjunum í kommununi, sum eru nevnd á umsóknarblaðnum. |

| | |
|---|---|
| 7. Treytirnar fyri at verða sett/ur á og at standa á bíðilistunum eru hesar:<br>a) Tygum skulu verða fylt/ur 18 ár.<br>~~b) Tygum skulu verða skrásett/ur sum búgvandi í Tórshavnar kommunu. Undantøk kunnu verða gjørd, um tygum einans fyribils eru flutt/ur ella flyta úr kommununi í útbúgvingarørindum ella arbeiðsørindum.~~<br>c) Tygum skulu ikki beinleiðis ella óbeinleiðis eiga fasta ogn í Tórshavnar kommunu, ið kann nýtast til privatan bústað. Tygum kunnu tó koma á bíðilista til grundstykki og/ella sambygthús, um tygum einans eiga íbúð í kommununi.<br>d) Tygum skulu ikki áður hava fingið tillutað aðra fasta ogn til privatan bústaðenn íbúð frá kommununi.<br>e) Eiga tygum íbúð ella hava tygum áður fingið tillutað íbúð frá kommununi, kunnu tygum ikki koma á bíðilista til íbúð.<br><br>8. ~~Um tygum eru búsitandi uttanfyri Føroyar í útbúgvingarørindum, og tygum ikki vóru skrásett/ur sum búgvandi í Tórshavnar kommunu, áðrenn tygum flutti úr Føroyum,kunnu tygum verða skrásett/ur á bíðilistunum hjá Tórshavnar kommunu tvey ár, áðrenn tygum verða skrásettur sum búgvandi í kommununi.~~<br>~~Eru tygum ikki skrásettur sum búgvandi í Tórshavnar kommunu í seinasta lagi tvey ár eftir, at umsókn tygara varð móttikin hjá kommununi, verða tygum strikað/ur av bíðilistunum uttan nærri fráboðan.~~<br><br>9. Treytirnar fyri at fáa tillutað fasta ogn eru, umframt treytirnar í 7 a-e, hesar:<br>a) Tygum skulu verða skrásett/ur sum búgvandi í Tórshavnar kommunu.<br>b) Hjúnafelagi/sambúgvandi maki tygara skal ikki beinleiðis ella óbeinleiðis eiga fasta ogn í Tórshavnar kommunu, ið kann nýtast til privatan bústað.<br>Tygum kunnu tó fáa tillutað grundstykki ella sambygt hús, um hjúnafelagi/-sambúgvandi maki tygara einans eigur íbúð í kommununi.<br>c) Hjúnafelagi/sambúgvandi maki tygara skal ikki áður hava fingið tillutað aðra fasta ogn til privatan bústað enn íbúð frá kommununi.<br>d) Eigur hjúnafelagi/sambúgvandi maki | 7. Treytirnar fyri at verða sett/ur á og at standa á bíðilistunum eru hesar:<br>a) Tygum skulu verða fylt/ur 18 ár.<br>b) Tygum skulu ikki beinleiðis ella óbeinleiðis eiga fasta ogn í Tórshavnar kommunu, ið kann nýtast til privatan bústað. Tygum kunnu tó koma á bíðilista til grundstykki og/ella sambygthús, um tygum einans eiga íbúð í kommununi.<br>c) Tygum skulu ikki áður hava fingið tillutað aðra fasta ogn til privatan bústaðenn íbúð frá kommununi.<br>d) Eiga tygum íbúð ella hava tygum áður fingið tillutað íbúð frá kommununi, kunnu tygum ikki koma á bíðilista til íbúð.<br><br>8. Treytirnar fyri at fáa tillutað fasta ogn eru, umframt treytirnar í 7 a-e, hesar:<br>a) Tygum skulu verða skrásett/ur sum búgvandi í Tórshavnar kommunu.<br>b) Hjúnafelagi/sambúgvandi maki tygara skal ikki beinleiðis ella óbeinleiðis eiga fasta ogn í Tórshavnar kommunu, ið kann nýtast til privatan bústað.<br>Tygum kunnu tó fáa tillutað grundstykki ella sambygt hús, um hjúnafelagi/-sambúgvandi maki tygara einans eigur íbúð í kommununi.<br>c) Hjúnafelagi/sambúgvandi maki tygara skal ikki áður hava fingið tillutað aðra fasta ogn til privatan bústað enn íbúð frá kommununi.<br>d) Eigur hjúnafelagi/sambúgvandi maki tygara íbúð ella hevur hjúnafelagi/-sambúgvandi maki tygara áður fingið tillutað íbúð frá kommununi, kunnu tygum ikki fáa tillutað íbúð.<br>e) Tað skulu í minsta lagi ganga fimm ár ímillum, at tygum og/ella møguligur hjúnafelagi/sambúgvandi maki fáa tillutað fasta ogn frá kommununi.<br><br>9. Um tygum eru fylt/ur 50 ár, kunnu tygum, hóast tygum ella hjúnafelagi/sambúgvandi maki tygara eiga grundstykki og/ella sambygt hús í kommununi, verða skrivað/ur á bíðilista og fáa tillutað eina íbúð frá kommununi.<br>Hetta er ikki galdandi, um tygum ella hjúnafelagi/sambúgvandi maki tygara frammanundan eiga íbúð í kommununi, ella áður hava fingið tillutað íbúð frá kommununi.<br><br>10. Tá fastar ognir verða útlutaðar í |

tygara íbúð ella hevur hjúnafelagi/-sambúgvandi maki tygara áður fingið tillutað íbúð frá kommununi, kunnu tygum ikki fáa tillutað íbúð.
e) Tað skulu í minsta lagi ganga fimm ár ímillum, at tygum og/ella møguligur hjúnafelagi/sambúgvandi maki fáa tillutað fasta ogn frá kommununi.

10. Um tygum eru fylt/ur 50 ár, kunnu tygum, hóast tygum ella hjúnafelagi/sambúgvandi maki tygara eiga grundstykki og/ella sambygt hús í kommununi, verða skrivað/ur á bíðilista og fáa tillutað eina íbúð frá kommununi. Hetta er ikki galdandi, um tygum ella hjúnafelagi/sambúgvandi maki tygara frammanundan eiga íbúð í kommununi, ella áður hava fingið tillutað íbúð frá kommununi.

11. Tá fastar ognir verða útlutaðar í sambandi við nýggja útstykking, verður lutakast um, hvør av teimum, sum standa fremst á bíðilistanum, og sum ynskja tað slagið av fastari ogn, ið verður útlutað, skal hava hvørja ogn. Lutakastið er alment.
~~Møguleiki kann verða fyri umbýti av fastognini, sum tygum fáa tillutað, um onnur fastogn er tøk.~~

Føstu ognirnar, sum eingin keypari er til, verða bjóðaðar teimum, sum standa fremst á bíðilistanum, og sum ikki áður hava fingið bjóðað fasta ogn í tí útbjóðingarumfarinum.

12. Um tygum ikki taka av tilboði um fasta ogn, tá tygum fáa hetta í boði, verða tygum standandi á sama stað á bíðilistanum.
Tygum kunnu tó í mesta lagi standa á bíðilistunum til fasta ogn í 15 ár frá tí, at umsóknarblaðið bleiv móttikið hjá kommununi.
Eingin umsøkjari kann tó verða koyrdur av nøkrum av bíðilistunum, fyrr enn viðkomandi hevur fingið í boði fasta ogn til privatan bústað frá Tórshavnar kommunu minst tvær ferð.

13. Um tygum taka av tilboðnum um fasta ogn, verða tygum strikað/ur av øllum bíðilistum.
Um tann fasta ognin, sum tygum fáa tillutað,

sambandi við nýggja útstykking, verður lutakast um, hvør av teimum, sum standa fremst á bíðilistanum, og sum ynskja tað slagið av fastari ogn, ið verður útlutað, skal hava hvørja ogn. Lutakastið er alment.
**Nýggj orðing:**
Í serligum føri kann Tórshavnar kommuna gera av, at møguleiki kann vera fyri umbýti av fastognini, sum tygum fáa tillutað, um onnur fastogn er tøk.

Føstu ognirnar, sum eingin keypari er til, verða bjóðaðar teimum, sum standa fremst á bíðilistanum, og sum ikki áður hava fingið bjóðað fasta ogn í tí útbjóðingarumfarinum.

11. Um tygum ikki taka av tilboði um fasta ogn, tá tygum fáa hetta í boði, verða tygum standandi á sama stað á bíðilistanum.
Tygum kunnu tó í mesta lagi standa á bíðilistunum til fasta ogn í 15 ár frá tí, at umsóknarblaðið bleiv móttikið hjá kommununi.
Eingin umsøkjari kann tó verða koyrdur av nøkrum av bíðilistunum, fyrr enn viðkomandi hevur fingið í boði fasta ogn til privatan bústað frá Tórshavnar kommunu minst tvær ferð.

12. Um tygum taka av tilboðnum um fasta ogn, verða tygum strikað/ur av øllum bíðilistum.
Um tann fasta ognin, sum tygum fáa tillutað, er ein íbúð, kunnu tygum, um tygum ynskja tað, verða standandi á bíðilistunum til hini sløgini av føstum ognum.
Um tygum eru yvir 50 ár og fáa tillutað eitt grundstykki ella eitt sambygt hús, kunnu tygum, um tygum ynskja tað, verða standandi á listanum til íbúð.

13. Tórshavnar kommuna kann í ávísum førum víkja frá ásetingunum í hesi reglugerð, um
serlig viðurskifti greitt tala fyri hesum.

*Soleiðis samtykt á býráðsfundi 26. mai 2008 og seinast broytt á býráðsfundi 28. mai 2009*

| | |
|---|---|
| er ein íbúð, kunnu tygum, um tygum ynskja tað, verða standandi á bíðilistunum til hini sløgini av føstum ognum.<br>Um tygum eru yvir 50 ár og fáa tillutað eitt grundstykki ella eitt sambygt hús, kunnu tygum, um tygum ynskja tað, verða standandi á listanum til íbúð.<br><br>14. Tórshavnar kommuna kann í ávísum førum víkja frá ásetingunum í hesi reglugerð, um<br>serlig viðurskifti greitt tala fyri hesum.<br><br>*Soleiðis samtykt á býráðsfundi 26. mai 2008 og seinast broytt á býráðsfundi 28. mai 2009* | |

**Fíggjarnevnd 19. februar 2014**
Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 4. mars 2014:** Einmælt samtykt.

## 37/14 Málslýsing Reinsaríið í Tórsgøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.02.2014 | 2/14 | 14/00944-61 |
| 2 Fíggjarnevnd | 19.02.2014 | 21/14 | 14/00944-61 |
| 3 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 37/14 | 14/00944-61 |

**Málslýsing:**
Vísandi til undanfarna samtykt í málinum, har játtaðar eru kr. 450.000 til kanningar og ráðgeving at bjóða arbeiðið út í høvuðsentreprisu, hevur arbeiðið higartil leitt fram til, at mælt verður til at broyta leist fyri hetta arbeiðið.

Orsøkin er, at kanningarnar av bygninginum hava víst, at umvælingararbeiðið í stóran mun best kann skipast sum smáar einkult standandi arbeiðstøkur, sum noyðast at fremjast í stigum, fyri at kunna taka støðu til, hvussu farast skal víðari fram. Hetta er serstakliga grundað á, at talan er um ein gamlan bygning, sum fyrst hevur havt nógva og skiftandi nýtslu, og síðan hevur staðið tómur. Hetta hevur havt sína ávirkan á týðandi bygningslutir, og neyðugt er sostatt at bróta niður partar fyri at fáa eina hylling á, hvussu farast skal víðari fram.

Tá talan er um slíkt arbeiði, sum nærum kann samanberast við restaureringsarbeiði, verður ofta mett, at tað er sera óheppið at binda seg til eina høvuðsentreprisu í sáttmála. Vandi er fyri at koma í ta støðu, at eitt av arbeiðunum avdúkar so týðandi trupulleikar, at neyðugt kann verða við munandi fleiri pengum fyri at fremja lidnu loysnina eftir avtaluni, sum er sáttmálabundin. Og tá hevur byggiharrin ringar møguleikar at annaðhvørt steðga á ella skifta loysn uttan stórar eykakostnaðir.

Skotið verður tí upp at brúka annan leist, at samlaða íløgujáttanin, ið eftir er, kr. 1.050.000, verður játtað til verkætlanina, og at bjóða arbeiðið út í smærri arbeiðstøkur sum undirhondsboð, so hvørt sum ein arbeiðstøka er avklárað.

Kostnaðarmeting fyri fyrsta umbyggingarstig verður løgd fram á fundinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1.050.000 av kontu 5376, L53002 Reinsaríið stigvis umbygging, og at einstøku arbeiðstøkurnar verður bodnar út sum undirhondsboð.

**Mentamálanevndin 9. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 24. november 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundi við Tórshavnar kommunu 16. november 2011 vísti Felagið MenTón á vantandi tónleikaumstøður í Havn, og ynski varð sett fram um, at Reinsaríið í Tórsgøtu verður spælistað. Teirra meting er, at tann núverandi ætlanin ikki er nøktandi til teirra virksemi. Í

hesum sambandi er neyðugt at kanna, um til ber at laga verkætlanina til tørvin hjá tónleikarunum, herundir ljóðviðurskifti.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 75.000 av kontu 5366 Stuðul annars til at kanna, hvussu bygningurin best verður lagaður til tørvin hjá tónleikinum.

**Mentamálanevndin 30. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Mikael Viderø, býararkitektur, varð biðin um at kanna um Reinsaríið eisini kann brúkast til rytmiskt spælistað.

Kontrast Arkitektar hevur gjørt nýtt uppskot av Reinsarínum.

Í nýggja uppskotinum, januar 2012, verður m.a. sagt:

“ Reinsaríið verður í dag eina mest nýtt til konsertir. Uppruna uppskotið var, at húsið skuldi nýtast til fleiri ymisk endamál, til tónleikaframførslur, almen tiltøk, bókakafe, uppihaldsstað fyri ungdómar á útferð, herundir dag- og frítíðarstovnar. Tað hevur verið eitt ynski, at broyta ætlanina, soleiðis at møguleiki er at brúka húsið til rytmiskt spælistað. Tískil eru ávísar broytingar gjørdar í mun til fyrra uppskotið. Meira luft er nú millum hæddirnar fyri at økja um rúmd (volumen). Men annars er tankin tann sami, við einum gjøgnumgangandi multifunktionaliteti.

Byggilistarliga hugskotið byggir uppá, at samantvinna tað gamla við nakað nýtt. Innan verður tað gamla varðveitt, sum er merkisvert í sær sjálvum, og við nýggjari innrætting og nútíðar sniði fæst ein meira tíðarhóskandi og nýtiligur bygningur. Hugskotið byggir eisini uppá at fáa ein polyvalentan bygning, sum við sínum mongu tiltøkum kann broyta funktión eftir tørvi. Hetta, at hava rúmini so opin sum møguligt og funktiónirnar mobilar. Rýmingartrappa í norðurskjøldrinum er eisini hugsað sum brúkstrappa.

Veghæddin skal kunna nýtast til rytmiskan tónleik, men eisini er møguleiki fyri øðrum framførslum. Pallurin verður í vestursíðuni á fyrstu hædd, við sitiplássum kring pallin, samstundis sum sitipláss verða kring opið á aðru hædd.”

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at arbeiða víðari eftir uppskotinum frá januar 2012, til eisini at gera Reinsaríið til eitt rytmiskt spælistað og samstundis varðveita multifunktionalitetin.

Á íløguætlanini 2012 konto 5375 eru avsettar 1 mió. kr.

Mælt verður til at játta 1 mió. kr. av íløgum 2012 til at arbeiða víðari í sambandi við liðugtgerð av Reinsarínum.

**Mentamálanevndin 11. januar 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina partin um peningajáttina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 1 mió. av íløguætlanini 2012 konto 5375 til at arbeiða víðari í sambandi við liðugtgerð av Reinsarínum.

**Ískoyti:**
Samsvarandi viðmerkingum frá húsaumsitingini og byggideildini hevur Kontrast tillagað uppskotið frá januar 2012, har dentur varð lagdur á at fáa viðurskifti í lagi í sambandi við bruna, funktión, kloakk, umhvørvi, trygd, lyftu, rørslutarnað o.a.

Gjørd er tí nýggj kostnaðarmeting, har samlaði kostnaðurin nú er mettur til 6,8 mió. kr. við mvg.

Ætlanin hevur verið at gera arbeiðið í stigum og í fyrsta umfari at fremja kjallarahæddina og miðhæddina. Hesin partur er mettur at kosta 3,5 mió kr. við mvg.

Á kontu 5375 L53002 eru 2,1 mió kr. tøkar til endamálið. Á íløguætlanini fyri 2013 konta 5375 eru avsettar 3 mió kr. aftrat.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 3 mió. kr. av íløgukontu 5375 til kontu 5375 L53002 Reinsaríið til at arbeiða víðari við liðugtgerðini.

**Mentamálanevndin 27. februar 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og harumframt til at mæla býráðnum til at játta 2 mió. kr. afturat til liðugtgerð, ið verður at fíggja soleiðis: kr. 1.660.000 av konto 5375 Skálatrøð og kr. 340.000 av konto 5175 Musikkskúlin. Játtanin upp á 2 mió. kr. til liðugtgerð er treytað av undirtøku frá mentamálanevndini.

**Mentamálanevndin 20. mars 2013:** Samtykt at taka undir við fíggjarnevndar-samtyktini 13. mars 2013.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Lisitatiónsúrslit:
Í sambandi við arbeiðið at at gera Reinsaríið til spælistað, var fyri uml. 2 mánaðum síðani arbeiði við niðurtøku og ísblásing av gamla timbrinum boðið út og sett í verk, meðan restin av útbjóðingartilfarinum var gjørt klárt. Tilboðini upp á hesi arbeiðini upp á uml. kr. 520.000 u/mvg.

Lisitatión í sambandi við restina av arbeiðinum, var hin 16. juli 2013. Fimm virkir vóru innboðin at lata inn tilboð, og trý teirra lótu inn tilboð.

Tilboðini vóru hesi:

Húsavarðartænastan: 4.947.191,- u/mvg

Træsmiðjan: 6.449.032,- u/mvg
Articon: 7.966.393,- u/mvg

Arkitekturin hevur eftirkannað tilboðini, og mælir til at taka av lægsta tilboðnum, frá Húsavarðatænastuni.

Fíggjarviðurskifti:
Við grundarlagi í omanfyri nevndu tilboðum upp á niðurríving, ísblásing og høvuðsarbeiðstøku, umframt keyp av elevatorstóli, verða samlaðu handverkaraútreiðslurnar mettar til kr. 5.772.000 u/mvg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til fylgjandi:

1. at taka av lægsta tilboðnum, og heimila umsitingini at gera sáttmála við Húsavarðatænastuna

**Mentamálanevndin 2. august 2013:** Nevndin samtykti at mæla til at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Býráðslimir tóku um teldupost undir við at seta samtyktina hjá mentamálanevndini í verk at formliga góðkenna á seinni fundi í fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á íløguætlanini fyri 2014 eru avsettar 2. mió, til Reinsaríið, til tess at fáa til vega fullfíggjaða hátalaraskipan, ljósskipan, innbúgv, o.a. Útvegan av hesum skal í gongd beinanvegin, til tess at halda tíðarætlanina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 2 mió. kr. av íløgukontu 5375 til kontu 5375 L53002 at fyrireika útvegan av hátalaraskipan, ljósskipan, innbúgvi o.ø.

**Mentamálanevndin 12. februar 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevnd 19. februar 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir04. mars 2014:** Einmælt samtykt.

# 38/14 Rottangaplássið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 05.02.2014 | 15/14 | 14/00625-57 |
| 2 Fíggjarnevnd | 19.02.2014 | 11/14 | 14/00625-57 |
| 3 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 38/14 | 14/00625-57 |
| 4 Býráðsfundir | | | 14/00625-57 |

## Rottangaplássið

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Leiðarin á kommunalu brennistøðini greiðir frá málinum um rottangaplássið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 24. apríl 2007:** Kunnað varð um málið, og notat j. nr. 2007-1213/2 varð lisið upp.

- Sum greitt varð frá um málið á seinasta fundi, og sum framgongur av notati j.nr. 2007-1213/2, er tørvur á einhvørjari skjótari loysn fyri at loysa trupulleikarnar á rottangaplássinum, um rottangatømingin skal halda fram.

**Tilmæli:**
Leiðarin á KB mælir til, at farið verður undir at gera neyðugar fyrireikingar til at etablera nýtt framkomið rottangapláss í grótbrotinum á Glyvursnesi, og at fígging verður avsett av íløgum. Nýtt rottangapláss skal helst verða liðugt innan 1-2 ár.
Samstundis mugu fyribils tiltøk fremjast á verandi rottangaplássið við t.d. tangum til rottangaevjuna. Mælt verður til at innkeyp av 1-2 tangum verður fíggjað av rakstri, og at innkeyp av fleiri tangum komandi ár verður fíggjað av íløgum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 2. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinumm hjá leiðaranum á kommunalu brennistøðini.

**Ískoyti:**
KB fekk tilboð uppá tanga til rottangaevju um mánaðarskifti juni/juli, og bílegging uppá 1 tanga til rottangaevju varð gjørd seinast í august. Tangin er tó ikki komin til landið enn. Síðani er tilboð upp á fundament eisini fingið til vega.
Samlaði kostnaðurin fyri tangaloysnina gerst væl hægri enn upprunaliga mett. Kostnaðurin fyri ein tanga, íroknað flutning, fundament, uppseting, 10% ókent og mvg verður á leið kr. 640.000 í mun til metingina á kr. 300.000.
Hesin kostnaður fyri ein goymslutanga (kr. 640.000) verður fíggjaður av rakstri í ár (2007).

Í 2008 eru avsettar kr. 2.000.000 til rottangatøming. Harav var ætlanin at gera avtalu við IRF um tøming av 2000 rottangum á kr 310 pr. stk. Og nýta restina av teimum kr. 2.000.000 til goymslutangar. Um IRF skal tøma 2000 rottangar, er fíggjarligt rúm fyri 2 goymslutangum, meðan upprunaliga málið var at fáa til vega 6 goymslutangar, fyri at nøkta tørvin.

Av tí at evjan framvegis er rættiliga bleyt, hóast hon hevur ligið á plássinum eina tíð, er tað bráðneyðugt at gera ein verjugarð í eystara borði á rottangaøkinum, fyri at fyribyrgja, at evja skolar oman av plássinum. Hesin verjugarður átti upprunaliga at vera, sambært

góðkenningini, men er ikki har, helst er hann spardur burtur. Kostnaðurin av at gera ein tílíkan garð er kr. 0,9 mió.

Skipað rottangatøming varð sett í gongd á heysti í 2006 og á vári 2007 vóru umleið helvtin av rottangunum (umleið 2000) í Tórshavnar kommunu tømdir. Tá mátti tømingin halda uppat, tí umstøður vóru ikki til at handfara meiri evju. Av tí sama mátti evjan frá umleið 300 tangum avskipast á pláss hjá IRF, og hevur Tórshavnar kommuna bundið seg til at taka ímóti somu nøgd aftur frá IRF. Síðani várið 2007 eru tí einans gjørdar bárðfeingis tangatømingar, umframt tøming av reinsiverkum.

Leiðarin á KB metir tað ikki vera vera forsvarligt at seta gongd á aftur skipaða rottangatøming fyrr enn fysisku umstøðurnar á móttøkuplássinum eru nøktandi, tí evjan kann ikki handfarast og goymast trygt undir núverandi umstøðum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á kommunalu brennistøðini mæla til:
1. At verjugarður verður gjørdur beinanvegin og fígging áljóðandi kr. 0,9 mió. fingin til vega av íløgum fyri 2008 (víst verður til skjal nr. 2007-1213/5)
2. At taka støðu til innkeyp av fleiri goymslutangum, tá ið royndir við fyrsta tanganum fyriliggja
3. At uppraðfesta nýtt framkomið rottangapláss, ið skal vera undir taki í grótbrotinum á Glyvursnesi, so tað kann vera liðugt um 1 ár.

Mett verður, at kostnaðurin fyri projektering verður uml. 0,5 mió.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 12. desember 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kommunala Brennistøðin hevur biðið um undirhondsboð frá J&K Petersen og Articon uppá at gera arbeiðið. Articon átti lægri boðið á kr. 694.300 u/MVG. Við 10% ókendum, 12 % ráðgeving og eftirlit, og 6,25 % MVG kemur arbeiðið í alt at kosta kr. 899.986.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á kommunalu brennistøðini mæla til:
1. At taka av tilboðnum frá Articon áljóðandi kr. 694.300 og játta kr. 0,9 mió. av íløgum fyri 2008 (av karminum til nýtt tyvingarpláss á Glyvursnesi) til verjugarð á rottangaplássinum í Húsahaganum.
2. At játta kr. 0,5 mió. av íløgum fyri 2008 (karminum til nýtt tyrvingarpláss á Glyvursnesi) til at projektera nýtt rottangapláss í grótbrotinum á Glyvursnesi.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 12. februar 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum, býarverkfrøðinginum og leiðaranum á kommunalu brennistøðini og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 28. februar 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**

Í sambandi við arbeiði at gera projektuppskot til nýtt rottangapláss (goymsluhøll til rottangaevju) á Glyvursnesi, gjørdist greitt, at ein tílík høll gerst rættiliga kostnaðarmikil. Tí avgjørdi byggibólkurin, at steðga á við at projekera høllina, og heldur kanna eftir, hvørjar aðrar loysnir verða nýttar aðrastaðni og sum eisini kunnu nýtast hjá okkum.
Samband varð tikið upp við Simon Moos Maskinfabrik A/S, ið er hevur serkunnleika í at menna og framleiða skipanir til handfaring av evju. Simon Moos skeyt í fyrstu atløgu upp eina skipan, ið nýtir avlopsorku frá Brennistøðini til at turka og hygiejnisera evjuna.
Umboð fyri Brennistøðina og umboð fyri ráðgevafyritøkuna Martin E. Leo hava verið á kunningarferð hjá Simon Moos og hugt nærri eftir hesi skipan, sum er í rakstri á Morsø. Í fyrstu atløgu sýnist ein slík skipan rættiliga áhugaverd, tó at neyðugt er við fleiri kanningum, áðrenn endalig støða kann takast.

Fyrimunir:
- Íløgukostnaður er helst væl lægri enn fyri eina goymsluhøll
- Óneyðugt við plássi í Húsahaganum/Glyvursnesi til rottangaevjuviðgerð.
- Rottangabilarnir sleppa undan at koyra niðan í Húsahaga/Glyvursnes at tøma. Hetta sparir tíð eins og spilltíð vegna kava og frost minkar.
- Lidna produktið (turkaða evjan) er nýtiligt til taðing, í mun til tað produktið, ið fæst við núverandi skipan, ið framvegis ikki er annað enn trupult burturkast, ið eingin vil vita av.
- Ókeypis orka fæst frá Brennistøðini til turking.
- Nytta fæst úr orkuni á Brennistøðini, sum annars verður køld burtur í konditioneringstorninum í filtrinum, harvið økist samlaða nyttustigið av orkuni úr burturkastinum.
- Ein trupulleiki við rakstrinum av roykreinsifiltrinum á Brennistøðini, ið kemst av at roykhitin aftaná ketilin og inn til filtrið er ov høgur, kann verða loystur við at taka orkuna til turkingina út millum ketilin og filtrið, og harvið køla um roykhitan til filtrið.
- Lidna produktið fyllir munandi minni enn við núverandi skipan, harvið minkar arbeiðið við at handfara lidna produktið eftirfylgjandi eins og plásstørvur til útleggin gerst minni.

Vansar:
- Arbeiðsorka skal til at reka og viðlíkahalda eitt tílíkt annlegg, og tí verður helst neyðugt at seta eitt fólk (handverkara) burturav til tað.
- Skipanin krevur elorku til at flyta evjuna fram gjøgnum skipanina
- Útreiðslur verða til eykalutir.
- Móttøkuumstøður til rottangaevju mugu gerast við síðuna av Brennistøðini á Hjalla (inni á økinum). Her verður hugsað um atkomuveg, móttøkuhøll, goymslutanga og vaskipláss.

Synergieffektir:
Tað at hava eitt slíkt turkiannlegg í samband við eina Brennistøð, ið hevur avlopsorku, gevur fleiri einastandandi møguleikar, fyri at fáa ein skilagóðan rakstur av annleggunum báðum. Nevnast kann:

- Luftin, ið hevur verið gjøgnum turkiannleggið (og sum luktar), kann nýtast sum forbrenningsluft til ovnin, harvið slepst undan at reinsa hesa luft, sum annars er rættiliga kostnaðarmikið (eins dýrt og turkiannleggið).
- Starvsfólk, ið verða sett til at passa eitt slíkt annlegg, kann nýtast til aðrar arbeiðsuppgávur á Brennistøðini, og eisini luttaka í vaktarskipan, tá serligur tørvur er vegna sjúku, summarfrítíð o.t.
- Eitt tílíkt annlegg skal koyra alt samdøgrið, eins og Brennistøðin eisini er mannað alt samdøgrið, og tí er fólk tøkt til at passa tað aftaná vanliga arbeiðstíð.

Avtalað er við Simon Moos Maskinfabrik A/S, at tey senda Tórshavnar kommunu eitt upplegg og eina kostnaðarmeting av eini slíkari skipan síðst í viku 44.

Á fundininum í heilsu og umhvørvisnevndini verður tøka tilfarið um skipanina lagt fram.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin, og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til:

1. At góðkenna, at arbeitt verður víðari við umrøddu loysn við at turka evjuna í staðin fyri at byggja eina goymsluhøll á Glyvursnesi.
2. At játta 3,6 mió., ið er eftir av íløgukarminum til renovatión í 2008, til hesa ætlan, tó so, at endaligt projekt verður at leggja fyri nevndina aftur, áðrenn nakað arbeiði kann fara í gongd.
3. At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndini við atliti at játtanunum (pkt. 2 og 3).

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 4. november 2008:** Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá býarverkfrøðinginum og leiðaranum á Kommunalu Brennistøðini.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin og tekniski stjórin leggja fram uppskot til fígging.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 4. november 2008:** Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá býarverkfrøðinginum og leiðaranum á Kommunalu Brennistøðini.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin og tekniski stjórin leggja fram uppskot til fígging. Samlaða verkætlanin, íroknað bygning, varmavekslara o.a. er mett til kr. 7,0 mió. Tá er roknað við keyp av brúktum anleggi til turkiprosessina fyri uml. hálvan prís. Sum nú er lúkur kommunan ikki krøvini í umhvørvislóggávuni um árliga rottangatøming. Klárgering av móttøkuni er mett at takað uml. 8-9 mánaðir.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og tekniski stjórin mæla til:

1. At taka undir við pkt. 1 og 3 í samtyktini hjá heilsu- og umhvørvisnevndini 4. nov. 2008.
2. At taka undir við at flyta avlopspening av prosjektunum 1015-90-15013 Tyrvingarpláss útbygging og 1015-90-15015 Verjugarður rottangapláss, tilsamans kr. 1.060.860, til prosjekt nr. 1015-90-15015 Nýtt rottangapláss, at leggja afturat verandi saldo á kr. 440.136,-. Víst verður til skjal 2007-1213/25.
3. At játtað kr. 5.500.000,- av íløgum fyri 2009 til verkætlanina. Víst verður til skjal 2007-1213/25.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Eisini samtykt at broyta íløguætlanina í fíggjarætlanini fyri 2009 samsvarandi.

**Býráðið 27. november 2008:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

**Ískoyti:**
Kommunala brennistøðin hevur heitt á Rambøll um at kanna, hvørt tað er gjørligt at nýta avlopsorku frá Brennistøðini til at turka rottangaevju í umrøddu skipan frá Simon Moos. Kanningin er nú liðug, og niðurstøðan er, at tað ikki er gjørligt at turka rottangaevnuna í umrøddu skipan. Sostatt er greitt, at tað ikki er grundarlag fyri at arbeiða víðari við hesi loysnini.

**Tilmæli:**
Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mælir til, at

1. Vent verður aftur til upprunaligu ætlanina um at byggja rottangapláss í grótbrotinum á Glyvursnesi.
2. Umsitingin letur gera projektuppskot hesum viðvíkjandi, innanfyri tann á býráðsfundi hin 27. november 2008 játtaða fíggjarkarmin, ið sostatt stendur við.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 28. apríl 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Í.s.v. at ábøtur skulu gerast á jarnplássið fyri at lúka treytir í umhvørvisgóðkenningini, er neyðugt at umraðfesta íløgurnar á renovatiónsøkinum.
Verkætlanirnar Tyrvingarplássið og rottangaøkið verða skipaðar undir somu verkætlan "Tyrvingarpláss á Glyvursnesi", sum verður býtt upp í byggistig, ið eru:

- Kloakk út á sjógv
- Rottangaøkið
- Tyrvingarøkið
- Avgrevstrarøkið

Bygginevndin, ið er vald fyri tyrvingarplássið, skal sostatt vera bygginevnd fyri øll byggistig í verkætlanini "Tyrvingarpláss á Glyvursnesi".
Játtanin til tyrvingarplássið og rottangaøkið verður ein samlað játtan, har ið bygginevndin kann áseta býtið millum byggistig og flyta ímillum byggistigini samsvarandi tørvi og raðfesting.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á heilsu- og umhvørvisdeildini og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til, at

- Skipa verkætlanirnar Tyrvingarpláss og rottangapláss sambært omanfyristandandi lýsing, t.v.s. í eina verkætlan við fleiri byggistigum.
- Bygginevndin, ið er vald fyri tyrvingarplássið, verður bygginevnd fyri alla verkætlanina við tilhoyrandi byggistigum
- At tað sum eftir er av játtanini til nýtt tyrvingarpláss og til nýtt rottangapláss, eftir at játtanin til jarnpláss á 3.700.000 er tikin av (BÝR 17/9-2009, mál 2009-1888) verður savnað í eina samlaða játtan til "Tyrvingarplássið á Glyvursnesi". Játtanirnar eru sostatt:

| Projekt | Játtan | Nýtsla (pr. 1/10-2009) | Avlop (pr. 1/10-2009) |
|---|---|---|---|
| Nýtt | 826.000 | 68.122 | 757.878 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| tyrvingarpláss | | | |
| Nýtt rottangapláss | 6.847.921 | 78.982 | 6.768.939 |
| - Jarnpláss | -3.700.000 | 0 | -3.700.000 |
| **Tøk játtan** | **3.973.921** | **147.104** | **3.826.817** |

- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og Umhvørvisnevndin 6. oktober 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 5. november 2009**: Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Býráðið hevur fyri fleiri árum síðani avgjørt, at nýtt tyrvingar- og rottangapláss skal gerast í grótbrótinum á Glyvursnesi. Samráðingar hava verið við Búnaðarstovuna og festaran um keyp ella leigu av økinum, men hesar eru ikki komnar á mál enn.

Í sambandi við verkætlan møguliga at gera golfvøll á Glyvursnesi, er roknað við at grótbrotið verður partur av økinum til golfvøllin.

Hetta ger, at neyðugt er at viðgera spurningin um staðseting av tyrvingar- og rottangaplássinum av nýggjum – herundir um grótbrotið skal nýtast til tyrvingar- og rottangapláss ella til golfvøll.

Stórur tørvur er á eini avkláring viðv. staðseting av tyrvingar- og rottangaplássi, tí kommunan sum er ikki lýkur lógarásett krøv viðv. rottangatøming, eins og verandi økið til hetta endamál verður fult um lutfalsliga stutta tíð. Tá skal eitt nýtt øki til tyrving og rottangaskipan verða liðugt og klárt at taka í nýtslu.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur málið um staðseting av rottanga- og tyrvingarplássi upp til politiska viðgerð sum skjótast, við atlti til eina endaliga avkláring, og við atliti til at avseta pening á langtíðar íløguætlanini, at fara undir fyrireikingar til at gera nýtt rottanga- og tyrvingarpláss at taka í nýtslu.

**Tekniska nevnd 5. februar 2014:** Nevndin samtykti, at umsitingin kannar møguleikarnar fyri øðrum staðsetingum av tyrvingar- og rottangaplássi, og at játta kr. 100.000 av konto 7175-L71001 til hesar kanningar, og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Fíggjarnevnd 19. februar 2014: **Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.**

**Býráðsfundir 4. mars 2014:** Einmælt samtykt.

## 39/14 Kunningarferð hjá fíggjarnevndini til Danmarkar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 19.02.2014 | 43/14 | 14/01381-1 |
| 2 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 39/14 | 14/01381-1 |

Fíggjarnevndin skal eftir ætlan til Danmarkar á kunningarferð í apríl 2014. Ferðin krevur góðkenning frá býráðnum.

**Fíggjarnevnd 19. februar 2014:** Samtykt at heita á býráðið at góðkenna ætlanina hjá fíggjarnevndini at fara kunningarferð í apríl 2014.

**Býráðsfundir 4. mars 2014:** Einmælt góðkent.

# 40/14 Eysturskúlin : Høvuðsumvæling 2. byggistig - Fyrispurningur til arbeiðstakarar um útbjóðing

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.03.2014 | 30/14 | 14/00415-24 |
| 2 Fíggjarnevnd | 03.03.2014 | 47/14 | 14/00415-24 |
| 3 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 40/14 | 14/00415-24 |

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Húsaumsitingin er farin í holt við at umvæla Eysturskúlan. A og B lonirnar eru gjørdar, og nú vanta C, D og E lonirnar.

Húsaumsitingin saman við arkitektinum hava verið á fundi við leiðsluna í skúlanum fyrr í ár. Leiðslan ynskti at E lonin varð gjørd fyrst, tí tey mettu hesa verða mest átroðkandi. Nøkur vindeygu eru skrúvaðið føst fyri ikki at detta úr. Havandi í huga at hesi eisini virka sum fluktvegir út á takið, er skilagott at gera hetta arbeiðið fyrst.

Sambært fyribils kostnaðarmeting verður hetta arbeiðið mett at koma at kosta uml.10 mill. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at fara undir arbeiðið á E-lonina. Hetta merkir, at aftrat teimum 5 mill. kr,. sum Húsaumsitingin hevur sett av til Eysturskúlan í ár, verður neyðugt at kunna seta 5 mill. kr. av játtanina til konto 82 í komandi ár til Eysturskúlan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Húsaumsitingin hevur heitt á ráðgevan A3 v/Hans Dávid Dam, ark. og biðið hann gera útbjóðingartilfarið fyri C lonina umframt tekjurnar, sum leiðslan ynskti (ikki E lonin hetta er ein misskiljing).

Innboðin lisitatión varð hildin og inn komu 3 tilboð. Tilboðini lógu upp á 12,9, 14,3 og 17,7 mió. kr. Lægstur við kr 12.938.329,00 lá Sp/f Karstin A.Joensen, byggimeistari í Kollafirði. Meting okkara var 12.027.035 mió. kr.

Fyri lítlum ári síðani fingu vit samlað tilboð frá spf ÁTS fyri bygningspartarnar C, D og E, og var hettar upp 20,9 mió. kr. - Fyri bygningspart C + tekjurnar, skuldi hettar givið kr. 12,6 mió. kr.

Ráðgevin hevur mælt til at taka av lægsta tilboðnum. Umsitingin hevur gjørt samlaða kostnaðarmeting, íroknað ókent, prístalsreguleringar, prosjekt, eftirlit og byggileiðsla og mvg, og er samlaði kostnaðurin mettur at blíva kr. 16.633.839,22, (skjal 2007-0625/4).

Upprunaliga varð roknað við at játtanin til hetta arbeiði skuldi verða av konto 82, umsiting av bygningum. Men í samband við fíggjarætlan fyri 2008 var avgjørt at talan var ikki um vanligt viðlíkahald, men heldur um eina íløgu í dagføring, og var tí avgjørt at játtanin fyri 2008 til hetta arbeiði skal av íløgum fyri 2008.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at tikið verður av lægsta tilboðnum, og at játtaðar verða kr. 16.633.839,22 av íløgum fyri 2008, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2007:** Útsett.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at tilboðið, sum víst verður til í tilmælinum omanfyri, verður fíggjað av íløgum fyri 2008 kr. 13.785.000,00, restupphæddin kr. 2.848.839,22 verða goldnar av konto 82, umsiting av bygningum, skúlamál.

**Mentamálanevndin 2. apríl 2008:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 13.785.000,00 av íløgum fyri 2008.

**Fíggjarnevndin 16. apríl 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 24. apríl 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
C lonin í Eysturskúlanum var liðugt høvuðsumvæld í 2008, sostatt eru A, B og C lonirnar umvældar.
Tá umvælingin av C lonini var liðug, varð í samráð við skúlan avgjørt at bíða eina tíð við framhaldandi umvælingunum, tí skúlin metti, at høvuðsumvælingin órógvar dagliga arbeiðið í skúlanum so mikið, at tørvur var á einum steðgi í eini tvey ár.

Tann tíðin er farin nú, og mælt verður tí til, at høvuðsumvælingin verður tikin upp aftur, og at farið verður í gongd við D lonina.

Ráðgevin metir, at kostnaðurin fyri projekteringina er 314.000 kr. uttan mvg. Við mvg og við at leggja nakað aftrat til óvæntað, verður metti kostnaðurin fyri at projektera liðugt og gera klárt til útboð 370.000 kr.

Gerast skal ein ráðgevarasáttmáli um projektering og eftirlit við høvuðsumvælingini. Ráðgevin, sum tók sær av hesi uppgávu, tá hinar lonirnar vórðu umvældar, hevur neyva vitan um bygningin og verkætlanina sum heild, og tí verður viðmælt, at heimild verður givin at gera sáttmála við hann aftur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at heimild verður givin at gera sáttmála við ráðgevan, sum tók sær av hesi uppgávu, tá hinar lonirnar vórðu umvældar.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at 370.000 kr. verða játtaðar av konto 4175, Dagføring av skúlum, til projektering av høvuðsumvæling av D lonini í Eysturskúlanum, soleiðis at hetta umvælingarstigið kann bjóðast út.

**Mentamálanevndin 1. desember 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og játta kr. 370.000 av íløguætlanini fyri 2011.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Fundur hevur verið við leiðsluna í Eysturskúlanum um høvuðsumvælingina av D-lonini. Á fundinum greiddi ráðgevin frá umvælingarætlanini, og skúlin hevði møguleika at gera viðmerkingar.

Ráðgevin hevur projekterað og gjørt kostnaðarmeting. Høvuðsumvælingin fevnir í høvuðsheitum um útveggir, máling innan, nýtt linoleum á gólvini, eftirbjálving, bøtta brunatrygd, gardinur, hitaskipan, el-hurðalæsiskipan og goymslurúm til klor, sum verður brúkt í svimjihylinum.

Sambært kostnaðarmeting, sum er í málinum, verður samlaði kostnaðurin kr. 11.572.412,11.

Ætlanin er at fara í gongd við umvælingina í august 2012, og arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 11.572.500 kr. av konto 4175, Dagføring av skúlum, til høvðusumvælingina av D-lonini í Eysturskúlanum

**Mentamálanevndin 13. juni 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Arbeiðið hevur verið boðið út í innbodnari lisitatión. Inn komu fýra tilboð, og var lisitatiónin mikudagin 27. august 2012.

Úrslitið varð:

| Arbeiðstakarar | Tilboð uttan mvg |
|---|---|
| P/f Articon | kr. 7.110.925,00 |
| Sp/f Bjarni Poulsen | kr. 8.373.795,00 |
| Sp/f Karstin A. Joensen | kr. 6.711.394,00 |
| Sp/f Húsavarðartænastan | kr. 7.969.578,00 |

Ráðgevin hevur kannað tilboðini og mælir til at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi kr. 6.711.394,-

Býráðið hevur áður játtað hesar upphæddir til umvælingararbeiðið:

16. des. 2010: kr. 370.000,00

28. juni 2012: kr. 11.572.412,11
Tils. kr. 11.942.412,11

Umsitingin hevur eftirfylgjandi gjørt samlaða kostnaðarmeting fyri alt arbeiðið, íroknað handverkaraútreiðslur, inniklima, projektering, eftirlit, byggileiðslu, prístalsregulering, prosjektumsiting, ókent og mvg, j. nr. 2012-0511/22, og metir, at arbeiðið kann gerast innanfyri áður játtaða fíggjarkarmin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av lægsta tilboðnum, at heimila umsitingini at taka upp samráðingar og gera sáttmála við lægsta tilboðsgevaran, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 5. september 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Høvuðsumvælingin av D-lonini er í gongd, og sambært tíðarætlanini verður arbeiðið at umvæla D-lonina liðugt í mai.

E-lonin er eftir at høvuðsumvæla, og mett verður skilagott, at høvuðsumvælingin heldur fram soleiðis, at tá D-lonin er liðug, kann farast undir umvælingina av E-lonini. Kann hetta arbeiðið fara í gongd í mai-juni, fer tað ikki at órógva skúlagongdina so nógv, tí tá eru próvtøkur. Nám X heldur til í E-lonini, og skúlin metir, at tað ber til at skipa próvtøkurnar hjá teimum í øðrum hølum í skúlanum, meðan umvælingin fer fram.

Um umvælingin ikki fer í gongd í mai-juni, verður neyðugt at finna onnur høli til Nám X í umvælingartíðini og helst fáa til vega játtan til leiguútreiðslur.

Metti kostnaðurin fyri projektering til liðugt útboð, eftirlit, byggileiðslu, bygningsumvælingar, tilfar, arbeiðsløn, projektumsiting og til óvæntað er 6.824.509 kr. v/mvg à 6,25%. Íroknað hesa upphædd eru eisini útreiðslur til ventilatiónsverk í D-lonini (L41009), sum greitt er frá niðanfyri.

Mett verður skilabest at gera sáttmála við sama ráðgeva, sum hevur havt allar hinar partarnar av høvðusumvælingina av Eysturskúlanum um hendi. Tí verður biðið um heimild at gera sáttmála við hann um projektering og eftirlit við høvðusumvælingina av E-lonini.

Ætlanin er at fara í gongd við umvælingina, tá D-lonin er liðugt umvæld, og ætlanin er, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión.

Viðvíkjandi D-lonini er møguleiki, at verandi ventilatiónsverk verður skift út við eitt nýtt, sum hevur hitaendurvinning við roterandi hitavekslara. Meirkostnaðurin fyri at velja hesa skipan, heldur enn hana, sum er í ætlanini, er 334.687 kr. Men mett verður, at meiríløgan verður afturgoldin í minni orkunýtslu yvir seks ár.

Í íløguætlanini fyri 2013 konta 4175 Dagføring av skúlum eru kr. 2 mió settar av til E-lonina, men roknað hevur verið við eisini at brúka avlop á løgukarminum fyri 2012 til endamálið. Har standa kr. 4,867 mió tøkar, tvs. samlaði løgukarmurin er kr. 6.867.000. Fígging er sostatt tøk á kontu 4175 Dagføring av skúlum til umvælingina av E-lonini og meirkostnaðin fyri annað ventilatiónsverk í D-lonini, í alt kr. 6.824.509.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at heimild verður givin at gera sáttmála við sama ráðgeva, sum hevur havt uppgávuna í sambandi við ymsu lonirnar annars, og at tað av íløgukontu 4175 Dagføring av skúlum verða játtaðar kr. 6.824.509 til høvuðsumvælingina av E-lonini, harav tó kr. 334.687 til ventilatiónsverk í D-lonini (L41009).

**Mentamálanevndin 6. februar 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. februar 2013:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 13. juni 2013:** Kunnað varð um málið

**Ískoyti**
Í Sambandi við dagføring av E-lonini í Eysturskúlanum varð ráðgevara sáttmálið um projektering, byggileiðslu og uppfylging undirskrivaður 12.juni 2013.

Arbeiðið varð boðið út í innbodnari lisitatión. Lisitatiónin var týsdagin 25. mars 2014.

Úrslitið varð:

| Arbeiðstakarar | Tilboð uttan mvg |
|---|---|
| spf Karstin A Joensen | Kr. 4.675.475,85 |
| Sp/f ÁTS v. Karstin Vang | Kr. 5.122.955,44 |
| Sp/f Húsavarðartænastan | Kr. 5.131.776,40 |
| Bjarni Poulsen | Kr. 5.607.746,00 |
| Spf Valbjørn Dalsgaard | Kr. 5.669.305,47 |

Ráðgevin hevur kannað tilboðini og hevur staðfest, at øll tilboðini eru kvalifiserað. Ráðgevin mælir til at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi kr. 4.675.475,85

Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting fyri alt arbeiðið, íroknað handverkaraútreiðslur, inniklima, projektering, eftirlit, byggileiðslu, projektumsiting, ókent og mvg, j. nr. 14/01693 og mælir til at kr. 1.200.000,00 verða fluttar frá avlopi á L 41009, D-lonin, til L41008, E-lonin, soleiðis at arbeiðið kann gerast innanfyri áður játtaða fíggjarkarmin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at kr. 1.200.000,00 verða fluttar frá avlopi á L 41009, D-lonin, til L41008, E-lonin.

Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla eisini til at taka av lægsta tilboðnum, at heimila umsitingini at taka upp samráðingar og gera sáttmála við lægsta tilboðsgevaran og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 3. mars 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevnd 3. mars 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðið 4. mars 2014:** Einmælt samtykt.

## 41/14 Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Tórshavn, Hoyvík, Sund, Mjørkadalur og Norðradalur og Koltur til býráðsvalið 13. november 2012 (2012-0824)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 41/14 | 14/01380-7 |

Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Tórshavn, Hoyvík, Sund, Mjørkadalur og Norðradalur og Koltur til býráðsvalið 11. november 2008, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

- Bjørgfríð Ludvig hevur sagt seg úr valstýrinum.

**Býráðsfundir 4. mars 2014:** Vald varð Ingibjørg Berg.

# 42/14 Val av 5 limum í kollegiunevndina fyri 4 ár

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 42/14 | 14/01691-3 |

**Býráðið 29. november 2012:** Vald vórðu Levi Mørk, Katrin Gaard, John av Reyni, Hanus Pál Jógvansson og Rói Poulsen.

**Býráðsfundir 4. mars 2014:** Vald vóru Regin Berg, Katrin Gaard, John av Reyni, Tór Marne Weihe og Rói Poulsen.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerini av málinum.

## 43/14 Val av 2 limum í nevndina fyri Føroya Barnaheim fyri 4 ár

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 43/14 | 14/01692-3 |

**Býráðið 29. november 2012:** Vald vórðu Levi Mørk og Leivur Thomsen.

**Býráðsfundir 4. mars 2014:** Vald vórðu Bjørghild Djurhuus og Leivur Thomsen.

## 44/14 Makaskifti + møguligt keyp av lendi til vegagerð.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 24.02.2014 | 46/14 | 14/00513-19 |
| 2 Fíggjarnevnd | | | 14/00513-19 |
| 3 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 44/14 | 14/00513-19 |

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Finnur Joensen hevur verið inni á byggideildini fyri at kanna um møguleiki er fyri at keypa ognina matr. nr. 1031c við ástandandi sethúsum. Hann upplýsti, at hesi sethúsini í einari hædd eru í so mikið ringum standi, at tey mugu takast niður. Áðrenn hann vildi gera endaligan sáttmála um keyp av ognini, ynskti hann eina váttan frá kommununi, at hon vildi góðkenna eini nýggj sethús uppá uml. 96 m² í tveimum hæddum við lágum takhalli.

Byggi- og nýtslustig er eingin trupulleiki fyri hesi bygging, hava umsøkjararnir fingið at vita, men trupulleikin er kravið í byggisamtyktini til pláss fyri 2 bilum.
Sum er, parkera matr. nr. 1031c, Landavegur 45, matr. nr. 1032, Landavegur 47 og matr. nr. 1030e, Landavegur 41, allir á parkeringsplássi við Landavegin, sum kommunan hevur gjørt í síni tíð. (sí loftmynd)
Av tí, at matr. nr. 1031c einans hevur atkomu við eini gøtu tvørtur um ánna, og umsøkjarin ikki sær nakrar møguleikar fyri vegatkomu við bili verður søkt um frávik.

**Lógir, ásetingar o. a.:**
Økið liggur í umráðispartinum A1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Umsóknin umfatar niðurtøku av verandi sethúsum og bygging av nýggjum. Ongar tekningar eru enn lætnar kommununi, men talan er um eini sethús á uml. 96 m² í tveimum hæddum. Um so er, verður eingin trupulleiki við byggi- og nýtslustignum.

**Frávik:**
Umsóknin hevur hetta frávik:
Einki bilpláss er møguligt á matriklinum. (uttan frá P-plássinum eystanfyri, sum helst ikki er ein góð loysn).

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarligt:**
Møguliga skulu nøkur parkeringspláss gerast afturat fram við Landavegnum.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum:**
Sí viðløgdu viðmerking frá Býarverkfrøðinginum j. nr. 2013-0809/2.
(men her má viðmerkjast, at um henda ætlan verður veruleiki er neyðugt, at ánarin má keypa jørð frá kommununi av matr. nr. 1031a til innkoyring)

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
Skal ikki til aðrar myndugleikar.

**Skjøl:**
Umsókn um frávik og matrikkulkort j. nr. 2013-0809/1
Ymiskt teldupostsamskifti við umsøkjaran
Viðmerkingar frá Býarverkfrøðinginum j. nr. 2013-0809/2
Loftmynd av økinum
Kortalkort av økinum

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini mæla til at ganga umsóknini á møti, treytað av at nýggj vegatkoma til stykkið verður gjørd frá almenna parkeringsplássinum við Handan Á, at kommunan játtar at umsøkjarin keypir neyðugt lendi burturav matr. nr. 1031a frá kommununi til innkoyring og at umsøkjarin ber allan kostnaðin av ætlanini.

**Tekniska nevnd 10. apríl 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.
Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum treytað av, at verandi vegatkoma millum ánna og parkeringsøkið verður útløgd til alment gøtusamband.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, saman við umsøkjaranum, kannað umstøðurnar fyri vegatkomu frá parkeringsplássinum Handan Á. Umsøkjarin hevur í hesum sambandi víst á, at tað er kostnaðarmikið fyri hann at gera neyðugu tillagingarnar í sambandi við vegatkomu og ynskir, at kommunan rindar fyri kostnaðin av arbeiðinum.

Umsitingin greiðir frá málinum (j.nr. 2013-0809/12).

**Tilmæli:**
Vísandi til samtyktina í teknisku nevnd 10. apríl 2013, sum var fortreyt fyri avgerðini at loyva innkoyring til ognina frá parkeringsplássinum Handan Á, mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini frá at ganga ynskinum hjá umsøkjaranum á møti um at kommunan rindar fyri kostnaðin av arbeiðinum.

**Tekniska nevnd 28. november 2013:** Nevndin samtykti at biðja umsitingina um eina løgfrøðisliga meting av, um kommunan hevur nakrar skyldur at átaka sær part av kostnaðinum av arbeiðinum, at leggja fyri nevndina aftur.

Løgdeildin hevur gjørt notat sambært nevndarsamtykt, sum verður framlagt á fundinum.

**Tekniska nevnd 15. januar 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til fundin í teknisku nevnd 28. november 2013. Eisini samtykt, at kommunan rindar fyri umlegging av gøtuni til alment gagnligt endamál.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Sí kortskjal 14/00513-21, verður talan um at makaskifta 79,8 fermetrar. Kommunan avgreiðir makaskiftið við marknaðarumskipan. Umsøkjari og kommunan rinda hvør sín helming av matrikuleringsútreiðslum, sum verða mettar til í alt uml. kr. 5.000,-.

**Tilmæli:**
Leiðarin í løgdeildini og kommunustjórin mæla til at makaskifta uml. 79,8 fermetrar sí uppskot til kortskjal 14/00513-21.

Tá ið vegaføringin er avgreidd, verður endalig uppmáting gjørd, og kann tá gerast talan um eina møguliga regulering av fermetrum.

**Fíggjarnevnd 24. februar 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 4. mars 2014:** Einmælt samtykt**.**

# 45/14 Umstøður til royking hjá búfólkunum á Boðanesheiminum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 17.02.2014 | 9/14 | 14/01193-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 19.02.2014 | 27/14 | 14/01193-1 |
| 3 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 45/14 | 14/01193-1 |

**Málslýsing:**
Reglurnar hjá Tórshavnar kommunu um royking á bústovnum eru, at á stovnum, sum virka sum heim fyri búfólki, eigur rætturin hjá búfólkunum at ráða í egnum heimi at verða virdur, tó soleiðis at tey ikki eru til ampa fyri onnur búfólk á stovninum. Her eigur at verða skipað fyri uppihaldsstovu ella rúmi til roykjarar, eins og tey sjálvi ráða fyri, um tey roykja inni hjá sær sjálvum.

Á Boðanesheiminum er trupulleiki, at búfólk sleppa ikki at roykja undir taki uttan so, at tað er í egnum búrúmi. Ein trupulleiki við at roykja inni hjá sær sjálvum er, at starvsfólk hava rætt til at arbeiða í roykfríum umhvørvi. Harumframt hevur royking inni í búrúminum avleiðingar við sær fyri inniluftina, trivnaðin millum búfólk og arbeiðsgongdir.

Mett verður neyðugt at finna hóskandi loysn skjótt, tí bæði húsfólk, avvarðandi og starvsfólk eru ónøgd við støðuna.

Á íløguætlanin fyri 2014 eru kr. 1 mió tøkar á konta 2775 eldrarøkt. Mett verður, at til ber at brúka hesa ella partar av hesi játtan til endamálið, og at eitt skjótt arbeiði eigur at verða sett í gongd í fyrsta lagi at fyrireika hóskandi loysn til roykiumstøður hjá búfólkunum á Boðanesheiminum at leggja fyri nevndina aftur til støðutakan. Møguliga verður neyðugt við ávísari fígging til fyrireikingar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at fyrireika hóskandi loysn til roykiumstøður hjá búfólkunum og játta kr. 100.000 av kontu 2775 eldrarøkt til endamálið.

**Trivnaðarnevndin 17. februar 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 19. februar 2014:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini.

**Býráðsfundir 4. mars 2014:** Einmælt samtykt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:10**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
| --- | --- | --- |
| Heðin Mortensen | Jógvan Arge | Helena Dam á Neystabø |
| Tróndur Sigurðsson | Halla Samuelsen | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Marin Katrina Frýdal |
| Bjørghild Djurhuus | Elin Lindenskov | Sjúrður Johan Olsen |
| | Sigrún Mohr | |